| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. februar 2019 | Blað nr.: 108<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. februar 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 29/19-48/19

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Bogi Andreasen
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam
Odd Færø
Tráin Petursson Nónklett luttók til mál nr. 29/19, 30/19, 47/19

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Marius Muller
Sigurð Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Annfinn Brekkstein

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. februar 2019 | Blað nr.: 109<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 29/19 | 16/03313-8 | Klintrifelag Føroya | 110 |
| 30/19 | 16/04764-5 | Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark | 116 |
| 31/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 123 |
| 32/19 | 17/02568-4 | Góðkenning av leigusáttmála um grundøki fyri egningarskúr við bátahylin á Argjum. | 125 |
| 33/19 | 14/00667-5 | Fyrispurningur um kommunan hevur áhuga í at yvirtaka niðara Áartún og uppsiga 10 ára avtaluna | 126 |
| 34/19 | 19/00735-2 | Eykajáttan til hjálp vegna vantandi barnaansing 2018 | 128 |
| 35/19 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 131 |
| 36/19 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 138 |
| 37/19 | 14/02605-15 | Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur | 154 |
| 38/19 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 159 |
| 39/19 | 17/02248-1 | Havnadalur - fríøkið | 167 |
| 40/19 | 19/00501-1 | Landavegur 3. Byggistig, frá Heygsvegnum til Marknagilsvegin | 172 |
| 41/19 | 17/01513-6 | Komandi útbjóðing av bussleiðini - útbjóðingartilfar og gerð av nýggjari farleið og ferðaætlan | 174 |
| 42/19 | 19/00427-1 | Golfvøllur – broyting av byggisamtykt | 179 |
| 43/19 | 18/02019-1 | Nýggj byggisamtykt fyri Hest | 182 |
| 44/19 | 18/03528-1 | Broyting í almennu byggisamtyktini í sambandi við frílendisætlan við Boðanes - Hoydalar | 185 |
| 45/19 | 18/03529-1 | Broyting í serstøku byggisamtykt nr. 7 í sambandi við frílendisætlan við Boðanes - Hoydalar | 188 |
| 46/19 | 19/00691-1 | Nýggj høli til rakstrarstovn við Oyggjarvegin matr. nr. 1230b | 191 |
| 47/19 | 19/00533-2 | 2018 September PHD project proposal | 193 |
| 48/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 197 |

## ***29/19 Klintrifelag Føroya***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 222/17 | 16/03313-8 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 238/17 | 16/03313-8 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 271/17 | 16/03313-8 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 312/17 | 16/03313-8 |
| 5 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 59/18 | 16/03313-8 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 118/18 | 16/03313-8 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 266/18 | 16/03313-8 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 308/18 | 16/03313-8 |
| 9 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 328/18 | 16/03313-8 |
| 10 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 24/19 | 16/03313-8 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 16/19 | 16/03313-8 |
| 12 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 28/19 | 16/03313-8 |
| 13 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 13/19 | 16/03313-8 |
| 14 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 29/19 | 16/03313-8 |

**Málslýsing:**
Klintrifelag Føroya er frítíðarfelag hjá klintrarum í Føroyum. Felagið hevur ein klintrivegg (hávegg) í Norðradali. Harumframt er ein innandura klintriháveggur á x metrar í Skúlanum við Løgmannabreyt, ið felagið eisini brúkar. Felagið hevur eisini verið aktivt innan at menna klintring í bjørgum v.m. kring oyggjarnar. Veitarar innan ferðavinnu veita eisini í ávísan mun tilboð innan klintring við línu t.d. á Skanasanum og við ferjuleguna á Gomlurætt, har eisini frítíðarklintrarar ofta eru.

Klintring er ein ítrótt, sum tekur seg alsamt meiri fram í grannalondunum innan at kalla allar aldursbólkar og kyn. Innan økið eru mentar mannagongdir og trygdarfyriskipanir, ið gera at talan er um eitt lutfalsliga trygt frítíðarítriv.

Felagið ynskir fegin at samstarva við Tórshavnar kommunu um at menna betri innandura klintrimøguleikar. Her verður skilt í millum sonevndar buldriveggir, ið eru upp til 4 metrar, har klintrað verður uttan línu og har mátta liggur undir sum stoytverja. Umframt sonevndar háveggir, ið t.d. ganga upp til 12-14 metrar og har trygdarlína verður brúkt.

Felagið er komið við ymiskum uppskotum til møgulig støð har ein klintridepil kundi verið gjørdur. Felagið leggur áherðslu á at tey sjálvi vilja vera ein aktivur partur í at menna anleggini bæði við arbeiðsmegi, serkunnleika v.m.

Á fundinum fer umsitingin at greiða frá nøkrum av uppskotunum hjá felagnum. Harumframt ynskir felagið fegin at fáa onnur uppskot frá kommununi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti at umsitingin fyrireikar málið víðari og kemur við einum tilmæli til fund í nevndini í heyst.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti 8. november 2017**:
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Tórshavnar havn um møguleikar fyri hesum virksemi í Bacalao. Umsitingin kemur á fundinum á vísa fram tekningar og møguligar hugsandi loysnir. Mest upplagt er at kombinera hetta virksemi við annað frítíðarvirksemi.

Hartil kemur spurningurin um fígging av leigukostnaði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara víðari við samskiftinum við Klintrifelagið um loysn í Bacalao og venda aftur til nevndina við einum úrsliti.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Felagið hevur gjørt skitsuuppskot til anleggið. Á fundinum verður greitt nærri frá hjálagda uppskotið og fyribils metingum kostnað.

Samstundis er samskifti í gongd við Skatefelagið og Veiði- og skjótifelagið. Til fundin í januar er væntandi at ein samlað disponering av virkseminum fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Í januar hevur umsitingn verið á ástaðarfundi í Bacalao saman við umboðum fyri Tórshavnar havn og Byggi- og umhvørvisdeildina. Talan var um ein innleiðandi dialog fyri at fáa yvirskipaða fatan av teimum treytum og krøvum, ið eru hugsandi í sambandi við møguligt frítíðarvirksemi í bygningunum og tí ikki í hesum umfari at rokna sum myndugleikaviðgerð ella líknandi. Ítøkiliga ætlanin er í bygninginum á Vestara bryggju 13.

Um frítíðarvirksemi sum t.d. klintring og skateing skal ein fyrireikandi greining gerast soleiðis at ein formlig umsókn kann sendast til byggivaldið. Stóra avbjóðingin í slíkari viðgerð er, í hvønn mun ásetingar í kunngerð nr. 72 frá 27. Juni 2017 um bygningskunngerð 2017 gera seg galdandi. Her kann serliga nevnast møgulig krøv í mun til brunatrygd, bjálving, atkomu, el-skipanir o.a.m. Samstundis er avgerandi, í hvønn mun tað ber til at fáa góðkenning til møgulig frávik, í mun til bygningskunngerðina.

Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at fyrireika uppskot til umsókn til byggivaldið um loysn í nevndu hølum til frítíðarvirksemi innan klintring, skateing og evt. annað. Tá vil dentur verða lagdur á at gera eina loysn, ið er so einføld sum tilber, og sostatt ikki er til óneyðug órógv fyri møguligar framtíðarætlanir hjá Tórshavnar havn fyri bygninginum. Alt hetta verður gjørd í samstarvi og við góðkenning frá Tórshavnar havn sum eigara og rakstrarharra í bygninginum. Mettur kostnaður er 35 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini til at fáa ráðgeva at fyrireika loysn og umsókn til byggivaldið saman við Tórshavnar havn til byggivaldið og í fyrsta umfari fíggjað nevnda ráðgevarakostnaðin av konto 5366 stuðul til ítrótt.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Víst verður til samtykt í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Tórshavnar havn ynskir at TK stendur fyri leigusáttmálanum við Tórshavnar havn og at TK síðani letur Skatefelagnum og Klintrifelagnum rætt til at innrætta hølini við sínum anleggum og rætti til at brúka hølini. Hugsanin er at Ítróttanlegg formliga kemur at standa fyri viðurskiftunum við feløgini. Til komandi fund verða klárir endaligar samstarvsavtalur um brúksrætt og um stuðul til gerð av anleggunum hjá feløgunum, umframt taka støðu til møguligan stuðul til hallarleigu. Næsta stig er at fáa fyrireika miðhøllina so at hon kann vera klár til virksemi hjá feløgnum sbrt. byggiloyvinum. Arkitektavirkið Ove Mortensen kemur at standa fyri fyrireiking av verkætlanini, at heinta inn tilboð, umframt hava eftirlit við arbeiðinum. Tá tað endaliga tilboðið fyriliggur ber til at gera endaliga kostnaðarætlan. Tá ber til at siga nærri um, hvat er neyðugt av fígging til samlaðu verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá klárgerð av miðhøllini á aðru hædd á Bacalao og at venda aftur í nevnd við endaligari kostnaðarætlan.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti**:
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764 Ólavur S. T. Thorsteinsson: Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura .

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Víst verður til samtyktina í máli 16/04764.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

Býráðsfundur 28. februar 2019: Víst verður til samtyktina í málinum 16/04764.

Marin Katrin Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni og tók Tráin Nónklett sæti í hennara stað.

# 30/19 Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 249/17 | 16/04764-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 273/17 | 16/04764-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 315/17 | 16/04764-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 60/18 | 16/04764-5 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 112/18 | 16/04764-5 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 119/18 | 16/04764-5 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 267/18 | 16/04764-5 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 309/18 | 16/04764-5 |
| 9 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 39/18 | 16/04764-5 |
| 10 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 327/18 | 16/04764-5 |
| 11 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 23/19 | 16/04764-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 15/19 | 16/04764-5 |
| 13 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 27/19 | 16/04764-5 |
| 14 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 12/19 | 16/04764-5 |
| 15 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 30/19 | 16/04764-5 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur fingið umsókn um frá Skatefelagnum um stuðul til eina innandura skatepark. Í verandi støðu hevur kommunan eitt uttandura skateanlegg sunnanfyri grasfløtuna á Frælsinum. Hetta er í hampiligum standi. Sí hjálagda mynd.

Kommunan hevur eisini í 2016 fingið áheitan (mál 16/03692) frá nøkrum dreingum um at fáa ein innandura skateboardbana.

Skatefelagið hevur gjørt eitt uppskot til møguligar loysnir. Sí hjálagt. Felagið hugsar at hetta eitt nú kundi verið gjørt í onkrum verandi bygningi, ið er egnaður til endamálið. Eisini hevur verið umrøtt at slíkt anlegg kundi verið undir eini uttandura takloysn har sum økið so eisini kundi verið brúkt til onnur endamál. Sí dømi hjálagt.

Á fundinum fer umsitingin við støði í uppskotinum at greiða frá møguligum hugsandi staðsetingum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og síðani at beina málið til ummælis í byggi- og býarskipanarnevndini við atliti til møguligar staðsetingar og hvørt ein staðseting í býarrúminum er áhugaverd.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti 8. november 2017**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Tórshavnar havn um møguleikar fyri skate-virksemi í Bacalao. Umsitingin kemur á fundinum á vísa fram tekningar og møguligar hugsandi loysnir. Mest upplagt er at kombinera hetta virksemi við annað frítíðarvirksemi.

Hartil kemur spurningurin um fígging av leigukostnaði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara víðari víðari við samskiftinum við Skatefelagið um loysn í Bacalao og venda aftur til nevndina við einum úrsliti.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Skatefelagið er í holt við at gera uppskot til skateanlegg í hølunum. Til fundin kemur eitt skitsuuppskot.

Samstundis er samskifti við Klintrifelagið og Veiði- og skjótifelagið. Til fundin í januar er væntandi at ein samlað disponering av virkseminum fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**

Umsitingin saman við Tórshavnar havn er saman við ráðgeva í holt við samskifti við byggivaldið um loyvi til at brúka hølini í Bacalao og avklára tilhoyrandi projektviðurskifti. Sí hjálagt skitsu v.m.

Ætlandi fyriliggur avkláring við byggivaldið í næstum, saman við kostnaðarmeting, tíðarætlan v.m.

Umsitingin kunnar um málið á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Fingin er nú til vega tekning, byggiloyvi og kostnaðarmeting fyri gerð av verkætlan til skating og klintring í Bacalao (sí hjáløgd skjøl).
Harumframt hevur Tórshavnar havn gjørt kostnaðarmeting fyri ymiskt í sambandi við elskipanina.

Sbrt. metingum hjá ráðgeva eru hondverkaraútreiðslurnar fyri verkætlanina mettar til 1.115 t. Tórshavnar havn hevur fingið mett el-arbeiðið til 219 tkr. Hartil skal leggjast afturat 10-15% til ókent, 6,25% til kommunalt MVG, umframt eini 6% til ráðgeving í sambandi við útbjóðing og eftirlit.

Støða er ikki tikin til møguligt býtið millum Tórshavnar havn og Tórshavnar kommunu. Hetta krevur eina nærri samráðing í sambandi við møguliga leigumálið.

Hartil kemur møguligur stuðul til skateanleggið og klintrianleggið inni í høllini. Tilfarskostnaðurin fyri klintrianleggið er mett til 418 tkr. og skateanleggið mett til 250 tkr.

Tá er roknað við, at feløgini standa fyri tí mesta av handverkaraarbeiðinum. Harumframt er tá ikki tikin hædd fyri hvussu nógva fígging feløgini sjálvi kunnu fáa til vega.

Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga tilfarið í málinum. Játtan er ikki tøk til verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Ískoyti**
Feløgini hava nú latið TK dagførd uppskot til fíggjarætlan fyri bygging av sjálvum anleggunum til ávikavist skateing og klintring í Bacalao. Teirra fíggjartørvur, tá íroknað nógv sjálvboðið arbeiðið er á.v.v.:

Skateanleggið: 258 tkr. íroknað MVG.
Klintrianleggið: 340 tkr. íroknað MVG.

Hartil kemur klárgerð av høllini sbrt. áður gjørdu meting t.e. umleið 1408 tkr. til umbyggingar og umvælingar av høllini og uttanfyri høllina (íroknað ókent, ráðgeving&eftirlit og kommunalt MVG).

Tórshavnar havn kemur ætlandi at gera el-arbiðið fyri egna rokning mett til umleið 200 tkr. Ætlanin er nú at fara í eina endaliga tilgongd við Tórshavnar havn at avklára markamót og um Tórshavnar havn skal standa fyri umvælingini av høllini.

Rakstur
Í næstum er ætlanin at gera endaliga rakstarætlan og avtalu fyri anleggið, herundir leigugjaldið til Tórshavnar havn. Mett verður hóskandi, at feløgini fáa ávíst endurgjald fyri hallarleigu. Kann samanberast við skipanina fyri ókeypis hallarleigu, ið er galdandi part av árinum.

Samanumtikið er ein fíggjartørvur á umleið 2.000 tkr fyri samlaðu verkætlanina. Arbeiðið at gera høllina klára kann ætlandi fara í gongd í endanum av árinum ella fyrst í komandi ári.

Skotið verður upp at fíggja verkætlanina av kontuni til smærri ítróttaanlegg (sí mál 18/03320 Játtan til smærri ítróttaanlegg v.m.). Har eru væntandi umleið ¼ av fíggingini til hesa verkætlan tøkar í 2018 og má so restin raðfestast í fíggjarætlanini fyri 2019, antin kontan til smærri ítróttaanlegeg ella kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at umsitingin fer undir at gera endaliga samstarvs- og rakstraravtalu við Skatefelagið og Klintrifelagið um menning og samstarv um klintri- og skatehøll í Bacalao.
b). At umsitingin fer undir at gera endaliga avtalu við Tórshavnar havn um umbygging og umvæling av ætlaðu hølini í Bacalao til frítíðarendamál og venda aftur í nevnd til endaliga viðgerð av málinum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot er gjørt til leiguavtalu millum Tórshavnar havn og kommununa um 400 m$^2$ á 2. Hædd í Bacalao bygninginum.
Leiguupphæddin er 120 tkr um árið. Tórshavnar havn ger tillagingar í elveitingini fyri góðar 200 tkr, sum verður fíggjað av rakstri.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála j.nr 16/04764-24.

**Vinnunevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Tórshavnar havn ynskir at TK stendur fyri leigusáttmálanum við Tórshavnar havn og at TK síðani letur Skatefelagnum og Klintrifelagnum rætt til at innrætta hølini við sínum anleggum og rætti til at brúka hølini. Hugsanin er at Ítróttanlegg formliga kemur at standa fyri

viðurskiftunum við feløgini. Til komandi fund verða klárir endaligar samstarvsavtalur um brúksrætt og um stuðul til gerð av anleggunum hjá feløgunum, umframt taka støðu til møguligan stuðul til hallarleigu. Næsta stig er at fáa fyrireika miðhøllina so at hon kann vera klár til virksemi hjá feløgnum sbrt. byggiloyvinum. Arkitektavirkið Ove Mortensen kemur at standa fyri fyrireiking av verkætlanini, at heinta inn tilboð, umframt hava eftirlit við arbeiðinum. Tá tað endaliga tilboðið fyriliggur ber til at gera endaliga kostnaðarætlan. Tá ber til at siga nærri um, hvat er neyðugt av fígging til samlaðu verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá klárgerð av miðhøllini á aðru hædd á Bacalao og at venda aftur í nevnd við endaligari kostnaðarætlan.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur nú fingið innheintað tilboð uppá klárgerð av høllini o.a. Hondverkaraútreiðslurnar eru mettar til 1.125.980 kr, umframt ráðgeving, ókent og kommunalt MVG samanlagt 1.412 tkr. Á løgukontu L57029 Smærri ítróttaanlegg v.m. eru 520 tkr. tøkar til verkætlanina og restin verður at fíggjað av kontuni 5575 Smærri ítróttaanlegg í 2019. Sí mál 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaranlegg v.m.

Til komandi fund verður tøk endalig samstarvsavtala við Skatefelagið um uppbygging, menning og rakstur av skateanleggi í Bacalao og samstarvsavtala við Klintrifelag Føroya um uppbygging, menning og rakstur av klintrianleggi í Bacalao.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga avtalu við Timburmeistara Rúni Brandur Dam um gerð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at innganga arbeiðstøkusáttmála við Rúna Brandur Dam og játta 1.412 tkr. av íløgukontu 5775 L57029 smærri ítróttaanlegg og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Marin Katrina Frýdal var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Ískoyti:**

Víst verður til ískoytið omanfyri, ið her verður nærri útgreinað.

Viðv. arbeiðstakarasáttmálanum
Arbeiðstakarasáttmálin (sí hjálagt skjal íroknað nøgdarlista og tekning) við Timburmeistara Rúna Brandur Dam (er nú umskipað frá ÍVF til Sp/f North built) er áljóðandi 773.500 kr, meðan positiónirnar 11, 13 og 14 í nøgdarlistanum eru rokningararbeiði, mett av ráðgevanum til umleið 350 tkr. Hetta vegna ávísar óvissur viðv. brunaklæðingararbeiði í høgari hædd.

Samlaður kostnaður at gera hølini klár íroknað ókent, mvg og ráðgeving er 1.412 tkr.

Í uppskoti er at fíggja arbeiðið av kontu 5775 smærri ítróttaranlegg, sí mál 19/00144 av játtanini fyri 2019.

Arbeiðið fevnir um eina røð av átøkum fyri at liva upp til galdandi krøv til brunatrygd í høllini og í gongini uttanfyri høllina, og sum eru trygdir fyri byggiloyvinum. Høllin verður ein høll uttan serliga upphiting og kann sambært byggiloyvinum heldur ikki upphitast.

Viðv. stuðli til anleggini
Til komandi fund í mentamálanevndini koma endaligu avtalurnar við Kintrifelagið og Skatefelagið til viðgerðar í mentamálanevndini, herundir stuðul til feløgini at byggja upp teirra anlegg, sum er klintriveggur og skatebreyt/-rampur. um mett til á.v.v. 340 tkr. og 258 tkr., t.e. 598 kr.
Hesin parturin verður fíggjaður at av kontu 5775 L57029 smærri ítróttaranlegg fyri 2018, sí mál 18/03320.
Samlaður fíggjartørvur til at gera hølini klár og at seta upp klintri- og skateanlegg er sostatt 2.010 tkr.

Stuðul til raksur
Vinnunevndin samtykti 1. oktober 2019, at leigusáttmálin við Tórshavnar havn um hølini skal ganga umvegis Tk/Ítróttaanlegg, og at kommunan so ger leiguavtalu við feløgini.
Leigan er 120 tkr. um árið. Feløgini hava latið inn uppskot til rakstarætlan, har søkt er um stuðul til hallarleigu.
Mett er hóskandi, at feløgini fáa ávíst endurgjald líknandi leistinum fyri ókeypis hallarleigu (sí samtykt 12. september 2018 í mentamálanevndini). Eftir teirri skipanini er ókeypis hallarleiga umleið átta og ein hálvan mánað av árinum. Sostatt skuldu feløgini fingið stuðul til umleið 2/3 av kostnaðinum t.e. 5.000 tkr./mán. í leigu hvørt felagið, og so 3.300 kr./mán. í stuðli hvør. Hetta verður ætlandi mælt til at játta av kontu 5365 stuðul til ítrótt. Hædd má takast fyri hesum økta fíggjartørvi á nevndu kontu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa til tilmælið til fund í mentamálanevndini 16. januar 2019 og fígging í málinum 19/00144.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Útsett.

Býráðsfundur 28. februar 2019: Tróndur Sigurðsson setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at finna aðra staðseting.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum móti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Tráin Nónklett, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu : Annika Olsen, Gunvør Balle,Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tráin Nónklett og Odd Færø.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, og Bjørg Dam.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni, og tók Tráin Nónklett sæti í hennara stað.

| | Býráðsfundur<br>28. februar 2019 | Blað nr.: 123 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 31/19 Mál beind í nevndir 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 32/19 Góðkenning av leigusáttmála um grundøki fyri egningarskúr við bátahylin á Argjum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 02.10.2017 | 53/17 | 17/02568-4 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 232/17 | 17/02568-4 |
| 3 Vinnunevndin | 11.02.2019 | 15/19 | 17/02568-4 |
| 4 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 32/19 | 17/02568-4 |

**Málslýsing:**
Við samanleggingini av Argja- og Tórshavnar kommunu, yvirtók Tórshavnar havn umsitingina av leigumálunum viðvíkjandi grundøkinum undir egningarskúrunum við bátahylin á Argjum.

Tað eru 6 skúrar tilsamans, har verandi leigusáttmálar eru ógreiðir, bæði fyri leigara og útleigara.

Ásmund Olsen hevur keypt ein av skúrunum, og ynskir at fáa eina átekning um hetta á leigusáttmálan.

Av tí at verandi leigusáttmáli er ógreiður, er uppskot gjørt til nýggjan 10 ára leigusáttmála, har egningarskúrurin framhaldandi skal brúkast til egning.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála.

**Vinnunevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vegna Ásmund Olsen søkir Sp/f S.H.Ráðgeving um loyvi at byggja eina 19 $m^2$ stóra frystigoymslu upp í vestara enda á egningarskúrinum á Argjum.

Pláss er til at byggja frystigoymslu upp í vestara enda á egningarskúrinum, og má leigusáttmálin av grundøknum fáa neyðuga átekning um hetta.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at taka undir við ískoyti til leigusáttmála, har verandi leigumál verður vaksið við 19 $m^2$.

**Vinnunevndin 11. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 33/19 Fyrispurningur um kommunan hevur áhuga í at yvirtaka niðara Áartún og uppsiga 10 ára avtaluna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 110/14 | 14/00667-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 126/14 | 14/00667-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 8/19 | 14/00667-5 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 28/19 | 14/00667-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 38/19 | 14/00667-5 |
| 6 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 33/19 | 14/00667-5 |

**Málslýsing - samandráttur**
Petur Háberg Jacobsen, ynskir at handa kommununi lidnu økini kring Áarstovu aftur.

**Áarstova suður.**
Økið út til Kongabrúnna. Sí leigumál 2009-1604/43 og kortskjal.
Økið er prýtt við grótlisum, grótborðum og benkrum. Inngirt við svartmálaðari girðing, og gongubreyt.

**Áarstova norður.**
Økið har standmyndin av Áarstovubrøðrunum stendur sí kortskjal 2012-0072/6

Felagið hevur staðið fyri og goldið arbeiðið, sum er gjørt í samráð við kommununa, sum er byggimyndugleikin.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna rindaði stóran part av arbeiðinum uppá økið har standmyndin stendur.
Niðara økið søkti leigarin um at nýta til útiborðreiðing.

Um leigumálið heldur uppat, skal leigarin sambært §6 í leigusáttmálanum lata tað leigaða økið aftur ruddað og í sama standi, sum tá leigumálið byrjaði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at yvirtaka økið, har standmyndin stendur, men mælir frá at yvirtaka økið til útiborðreiðing aftur, fyrr enn treytirnar í §6 um at rudda økið og lata tað aftur í sama standi, eru loknar.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting at víst verður umsøkjaranum á ásetingarnar í sáttmálanum viðvíkjandi niðara parti av økinum.

**Ískoyti.**
Viðvíkjandi torginum Áarstova Suður. Verandi leiðari Sp/f B & B, søkir enn eina ferð kommununa um at enda leigumálið, og at yvirtaka tað sum er bygt á torginum. ( Grótflísar, borð,benkur v.m. )

Leigumálið er galdandi til tann 01. juli 2020 tá tað gongur út, og hevur kommunan rætt til at gerast eigari av tí ið bygt er á økinum, fyri tað, sum tað verður mett til.

Eigarin bjóðar kommununi tað bygda ókeypis til ognar.

Tað skal viðmerkjast, at samtyktin sum var gjørd í teknisku nevnd 30. apríl 2014, og í fíggjarnevnd 19.05.2014, var gjørd út frá skeivum upplýsingum. Víst verður í samtyktini til § 6 í leigusáttmálanum har tað framgongur, at leigari tá ið leigusáttmálin heldur uppat, skal lata tað leigaða økið aftur ruddað og í sama standi, sum tá leigumálið byrjaði.

Henda áseting er ikki í galdandi leigusáttmála, sum ongar ásetingar hevur av hesum slag.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Økið við Kongabrúnna, eisini nevnt Áarstova suður í tekstinum omanfyri, er ein liður í fríðkanini av býnum, og er økið somuleiðis ein partur av býarmyndini. Smærri torg og skot eru liðir í miðbýarætlanini, har dentur verður lagdur á at skapa innbjóðandi býarrúm. Økið er sera snøgt, men sjáldan síggjast fólk uppihalda sær á økinum, sum lagt hevur verið upp til. Grundað á hugsanina í miðbýarætlanini mælir umsitingin til, at kommunan yvirtekur økið sum ein part av rakstrinum, soleiðis at hetta kann gerast til eitt innbjóðandi torg og ein liður í eini størri heildarmynd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kommunan yvirtekur økið (sambært kortskjali) sum ein part av rakstrinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Turið Horn var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 34/19 Eykajáttan til hjálp vegna vantandi barnaansing 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 69/19 | 19/00735-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 60/19 | 19/00735-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 34/19 | 19/00735-2 |
| 4 Býráðsfundur | | | 19/00735-2 |

**Upprunin til málið:**
Uppgerð frá Almanaverkinum um afturrindan av veitingum í sambandi við vantandi barnaansing

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sambært forsorgarlógini § 9 kunnu foreldur, ið ikki fáa ansingarpláss, søkja Almannaverkið um fyribils uppihaldshjálp. Sbrt. uppgerð fyri alt árið 2018 er talan um kr. 467.710,84, ið kommunan skal afturrinda landskassanum.
Hetta er longu gjørt sum mótrokning í kommunuskattaavrokningini og skrásett í kommunala mánaðarroknskapinum konta 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing fyri desember 2018.

Sambært uppgerðini er talan um í alt 19 foreldur, sum hava fingið uppihaldshjálp. Fyrsta gjaldið er í februar 2018, longsta tíðarskeiðið, ið veitt er fyri, er 4 mánaðir.

Játtanin í 2018 er kr. 66.000, so meirnýtslan er í alt kr. 406.711, ið krevur at verða fíggjað.

Henda konta hevur í mong ár at kalla onga játtan havt, tí tørvurin á ansingarplássum hevur verið nøktaður. Verður farið aftur til árið 2010, tá stórur plásstørvur eisini varð, rindaði kommunan uml. kr. 1,6 mió til hjálp vegna vantandi barnaansing, meðan tað árið eftir varð komið niður á uml. kr. 235.000 fyri síðan at detta burtur.

Sum øllum kunnugt hevur kommunan havt stóran fólkavøkstur síðstu árini, eisini av børnum, sum hevur sett stórt trýst á dagstovnaskipanina. Síðstu tvey árini hevur verið arbeitt miðvíst við at økja um plásskapasitetin, har fleiri nýggj pláss eru komin aftrat, og fleiri eru á veg, har málið sjálvandi er at nøkta allan ansingartørv sum skjótast.

Tá foreldur søkja Almannaverkið um fyribils uppihaldshjálp vegna vantandi barnaansing, krevst váttan frá kommununi. Eftirkanningin fer fram í BARN skipanini. Váttað verður fyri Almannaverkinum, nær foreldrið hevur roynt at bóka pláss, nær foreldrið ynskti pláss, og nær fyrst tøka pláss var. Vísir eftirkanningin, at tað ikki hevur borið til hjá foreldrinum at bóka pláss til ynsktu tíð, gevur kommunan váttan.

Almannaverkið viðgerð síðani umsóknina um hjálp vegna vantandi barnaansing eftir treytunum fyri fyribils uppihaldshjálp. Tað merkir eisini, at ikki allir umsøkjarar fáa útgjald.

Eins og støðan var í 2010 og fyri tað, sendir Almannaverkið bert eina ársuppgerð til kommununa. Biðið er um at fáa yvirlit yvir játtaðar umsóknir so hvørt, t.d. hvønn ársfjórðing, so til ber hjá kommununi at stýra játtanartørvinum.

Upplýsast kann, at higartil í ár hava 13 søkt kommununa um váttan fyri vantandi barnaansing, harav 6 teirra lúka treytirnar fyri at fáa váttan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Forsorgarlógin

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður ikki møguligt at fíggja meirnýtsluna á kontu 3210 innanfyri grein 3 í fíggjarætlanini. Skotið verður upp at játta kr. 406.711 av kontu 20910 Aðrar inntøkur. Talan er um eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Víst verður til mál um at útvega fleiri dagstovnapláss (mál 17/03897, 19/00224, 19/00411 og 19/00412).

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Eingi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Skriv frá Almannaverkinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 406.711 av kontu 20910 Aðrar inntøkur til kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing sum eykajáttan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

# 35/19 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu  als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | | 669 | | 850 | | 906 | | 1.124 | | 1.415 | |
| **Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)** | | | | | | | | | | | | |
| **Pláss/Dekningsstig** | **97** | **21,2%** | **155** | **23,2%** | **222** | **26,1%** | **251** | **27,7%** | **298** | **26,5%** | **298** | **21,1%** |
| *har av røktarbúpláss* | *87* | *19,0%* | *145* | *21,7%* | *204* | *24,0%* | *213* | *23,5%* | *252* | *22,4%* | *252* | *17,8%* |
| *har av stutttíðarpláss* | *10* | *2,2%* | *10* | *1,5%* | *18* | *2,1%* | *38* | *4,2%* | *38* | *3,4%* | *38* | *2,7%* |
| *har av røktaríbúðir* | *0* | *0,0%* | *0* | *0,0%* | *0* | *0,0%* | *0* | *0,0%* | *8* | *0,7%* | *8* | *0,6%* |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð støðd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð støðd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 $m^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 $m^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið “*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*”.

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

## 36/19 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |
| 50 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 196/18 | 14/03408-18 |
| 51 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 73/19 | 14/03408-18 |
| 52 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 61/19 | 14/03408-18 |
| 53 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 36/19 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd,

ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:

- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabygginini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at

fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum - 287.151.814 kr.
P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum - 298.955.524 kr.
(eisini nevnt: Samtakið í Havn)
P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum - 267.809.320 kr.

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst

at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F
c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjaræltanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystsbø hevur boðað frá, at hon ynskir at taka seg úr stýrisbólkinum fyri "Nýggjur skúli í vesturbýnum".

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at Helena Dam á Neystabø tekur seg úr stýrisbólkinum og at Bjørghild Djurhuus tekur sætið í stýrisbólkinum.

**Ískoyti:**
Viðv. broyting av takbelegningi
Innanhýsis stýrisbólkurin og Stýrisbólkurin fyri skúlan á Fløtum hevur eftir áheitan frá Húsaumsitingini viðgjørt spurningin um, hvørt tað er betri at brúka takpapployson ístaðin fyri takmembran (takdúk) á tekjuni á oyggjunum (omaná bygningunum 1-7, tó ikki miðøkið). Takpapp er minni viðbreki fyri herverki, skaðum v.m., umframt nakað høgligari at røkja og viðlíkahalda.

Meirkostnaður fyri at skifta frá membrani til papp er 4.056.754 kr. + kommunalt MVG. Innanhýsis stýrisbólkurin mælir til at broyta takbelegningin til takpapp. Í mun til verkætlanina er broytingin at rokna sum eitt tilkeyp og kann tí ikki fara av puljuni til ókent og eiheldur er rúm fyri hesi íløgu á øðrum kontum í verkætlanini. Tí er neyðugt at økja samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina við hesi upphædd.

Ætlandi verður byrjað at leggja takpapp í mars 2019 og tekur tað arbeiðið nakrar mánaðir.

Viðv. innbúgvi og uttandura økið
Sum greitt frá í framløgu í sambandi við viðgerðina í nevndini á sumri 2018 er greitt, at áður gjørd meting í 2016 um kostnaðin av hóskandi innbúgvi v.m. ikki heldur í mun til tað, sum nú verður mett rímiligt. Á fundinum verður innleiðandi greitt frá metingini og atlitunum í málinum. Á einum komandi fundi kemur endalig tilráðing um málið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at leggja takkpapp á bygningin í staðin fyri membran, og í hesum sambandi at hækka samlaða løgukarmin fyri byggiverkætlanina við 4.056.754 kr. + kommunalt MVG at fíggja yvir løgujáttanina í 2020.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 37/19 Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 120/14 | 14/02605-15 |
| 2 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 144/14 | 14/02605-15 |
| 3 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 23/17 | 14/02605-15 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 70/17 | 14/02605-15 |
| 5 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 95/17 | 14/02605-15 |
| 6 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 59/18 | 14/02605-15 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 281/18 | 14/02605-15 |
| 8 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 244/18 | 14/02605-15 |
| 9 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 273/18 | 14/02605-15 |
| 10 Tekniska nevnd | 12.02.2019 | 6/19 | 14/02605-15 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 42/19 | 14/02605-15 |
| 12 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 37/19 | 14/02605-15 |
| 13 Býráðsfundur | | | 14/02605-15 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Ætlanin er at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri at fáa sett upp ljósregulering á vegamótinum Ringvegur/Hvítanesvegur.

Á fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 1,5 mió. til Eystari ringv./Hvítanesvegur – ljósregulering, á konto fyri íløgur, nr. 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur. Mælt verður eisini til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jan Christiansen, metir at besta ferðslu loysnin er, at gera eina rundkoyring og tekur tí ikki undir við at játta pening til ljósregulering.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykkir at mæla býráðnum til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Bogi Andreasen, vísir til støðuna hjá minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Ferðslunevndin 30. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

Umsitingin leggur fram fyriliggjandi skitsu uppskot j. nr 2012-0279/6.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nógvir ivaspurnignar hava verið frammi um farast skal undir at gera rundkoyring ella ljósregulering. Ì hesum sambandi verður víst til fylgjandi mál:

1. Mál nr. 2002-1244 Rundkoyring við Hvítanesvegin/Eystara Ringveg viðv. uppskoti um rundkoryring upp á Diametur 37 m.

2. Mál nr. 2008-3700 Nevndarviðgerð: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur, Diametur 30 m, kostnaður kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4.

3. Mál nr. 2008-3699 Fíggjarviðurskifti: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur viðv. tilboði upp á rundkoyring við ymsum diametrum.

4. Mál nr. 2007-3545 Fyrispurningur til Rambøll viðv. fyrimunum og vansum á vegaøkinum við Eystara Ringveg.

Fyri at fáa staðfest kostnaðin í dags prísum á rundkoyringum sambært omanfyri standandi málum, verður neyðugt at fáa kannað einleikaprísirnar fyri fyriliggjandi uppskotum. Tá hetta er gjørt, ber betri til at samanbera kostnaðarstøðið við uppskotið um ljósregulering á vegamótinum.
Til tess at fáa lýst fyrimunir og vansar ítøkiligari hvat sjálvari ferðsluni viðvíkur, við antin at gera rundkoyring ella ljósregulering, ber til at gera hetta við simuleringum av ferðsluviðurskiftunum á vegamótinum, sum ráðgevi hevur gjørt.

Umboð fyri Rambøll kemur at leggja fram simuleringar.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Umsitingin verður biðin um at koma við kostnaðarmeting av rundkoyring við hóskandi diametri og trafikkstýrdari ljosregulering at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt 27.02.2013 saman við ráðgeva gjørt kostnaðarmeting.

**Tekniska nevnd 30. april 2014: Útsett.**

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjøgnumgingið málið av nýggjum. Tað hava verið fleiri loysnir havdar á lofti bæði við rundkoyringum og ljósregulering. Umsitingin metir, at besta og bíligasta ferðsluloysnin er ein ljósregulering.

Neyðugt er at eftirkanna prosjektuppskotið frá 2012 og at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar. Tá høvuðsprosjektið er gjørt liðugt, verður greitt, í hvønn mun tað verður neyðugt at ogna sær lendi til verkætlanina.

**Víst verður til hesi skjøl**
TK j. nr. 17/00917-3 Rambøll Nyvig – Skitseforslag til overslag

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við loysnini við ljósreguleringini á vegamótinum Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur. Mælt verður eisini til at heita á ráðgevan um at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar, og at játta kr. 400.000,- til endamálið av íløgukontoini fyri vegir, konto 8175, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017: Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Turið Horn samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.**

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men at kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring eisini fyriliggur, tá málið kemur aftur í nevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017: Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.**

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at ein kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring fæst til vega, áðrenn støða verður tikin í málinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ljóskurvarnar við vegamótið Hvítanesvegurin – Eystari ringvegur, eru enn nakrar avbjóðingar við at fáa ferðsluna at glíða optimalt. Serliga vísir tað seg at vera torført at fáa ferðsluna at glíða á Eystara ringvegi, móti vegnum Yviri við Strond, í meldurtíðini. Bilrøðin kann strekkja seg, frá ljóskurvunum og heilt oman móti tyrlupallinum. Hetta ber í sær, at ferðslan frá Hoyvíksvegnum inn á ringvegin eisini verður tarnað.

Umsitingin hevur umrøtt hvør loysnin kann vera og er komin fram til at gera eina høgrasvingsbreyt. Hendan fer at stytta munandi um bilrøðina her, sí viðfestu mynd

(Hvítanesvegur – ringvegur_breiðan.jpg). Samstundis skulu setast upp fleiri høgrapílar í vegamótinum.

Tekniska fyrisitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting frá ráðgeva á 1,3 mió. kr. uttan MVG fyri breiðkanina av Eystara ringvegi. Ætlanin er somuleiðis at breiðka Hvítanesvegin frá vegamótinum og oman til Hoydalsá. Her er mettur kostnaður umleið kr. 500.000, umframt útbygging av ljóskurvunum.

Í sambandi við frílendið niðanfyri, móti Hoydølum, er komið ynski um ein ljóðvolla, sum fer at dýrka verkætlanina nakað.

Samlaður kostnaður er mettur til kr. 1,9 mió. kr.

**Tá hetta arbeiði er gjørt, væntar bert at breiðka Eystara ringveg á teininum frá ljóskurvunum og niðan móti rundkoyringini á Hálsi.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður framd sum skjótast og fíggjað av tøkum peningi og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 1,9 mió. av konto 6875 L00001 og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 25. oktober 2018: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 29. november 2018: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið í sambandi við at breiðka Eystara ringveg og Hvítanesvegin oman til Hoydalsá hevur verið í útboði og komu tvey tilboð inn. Frank Hellisdal kann gera arbeiðið fyri kr. 2.359.400,- uttan MVG og Konsax fyri kr. 2.092.410,34 uttan mvg. Umsitingin metir, at leggjast skal upp fyri ókendum útreiðslum, projektering og byggileiðslu. Samlaði kostnaðurin verður sostatt mettur til kr. 2.450.000,- íroknað 6,25% MVG.

Áður eru játtaðar kr. 1.900.000,- til breiðkanina, sostatt mangla kr. 600.000.

Umsitingin vísir á, at væntandi játtan kann fíggjast av kt. 8175, projekt "L81017 Dagføring av Hóvabrekku", har tað standa kr. 875.000, sum ikki verða nýttar í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at tikið verður av tilboðnum frá Konsax.
- at verkætlanin verður sett í verk skjótast til ber.
- at manglandi játtan uppá kr. 600.000 verður at fíggja av kt. 8175, projekt "L81017 Dagføring av Hóvabrekku.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 12. februar 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.**

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 38/19 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 269/16 | 14/05065-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 378/16 | 14/05065-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 304/16 | 14/05065-1 |
| 17 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 58/17 | 14/05065-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 214/17 | 14/05065-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 79/17 | 14/05065-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 225/17 | 14/05065-1 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 241/17 | 14/05065-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 12.12.2017 | 81/17 | 14/05065-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 88/18 | 14/05065-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 124/18 | 14/05065-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 146/18 | 14/05065-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 123/18 | 14/05065-1 |
| 27 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 151/18 | 14/05065-1 |
| 28 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 265/18 | 14/05065-1 |
| 29 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 355/18 | 14/05065-1 |
| 30 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 319/18 | 14/05065-1 |
| 31 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 23/19 | 14/05065-1 |
| 32 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 44/19 | 14/05065-1 |
| 33 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 38/19 | 14/05065-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr.   60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:

- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í framhaldandi menningini av Steinatúni, so hevur umsitingin fingið ráðgeva at gjørt uppskot til tak/skýli at staðseta í Steinatúni.

Skýlið kemur at virka sum bæði eitt bussskýli, umframt eitt tak til uppihald. Talan er um at gera eitt eyðkent bussskýli í høgari góðsku, umframt at ætlanin er at gera eitthvørt, sum víkir frá verandi bussskýlum, so sum eina til tvær reiggjur, har fólk kunnu stytta sær um tíðina, meðan bíðað verður eftir bussinum. Sí skjal nr. 14/05065-41, sum vísir hvussu skýlið kemur at taka seg út á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at íverkseta projektering, útbjóðing í heildarveiting og uppseting av bussskýlinum, umframt at játta umsitingini at fara undir at planleggja næsta byggistig av Steinatúni, sum er at umbyggja norðaru síðuna av Steinatúni og at játtaðar verða kr. 2 mió. av konto 6275 til hesi arbeiðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Kunnað varð um málið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Verandi uppskot leggur ikki upp til lívd í mun til regn og vind, tí hevur verið tosað við ráðgevan frá Zeta Arkitektar um at gera nýtt uppskot til sjálvt skýlið undir hálvtekjuni.

Kunnað verður um nýggja uppskotið á fundinum, har ráðgevin kemur at greiða frá broytingini, ið skal tryggja lívd til tey, ið bíða eftir bussinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggja uppskotið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um annað alternativt uppskot - *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli kemur mánadagin**.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til høldar ráðgevarasáttmála við Zeta Arkitektar áljóðandi 324.600,00 kr. uttan mvg. at standa fyri høvuðsprosjekti, útbjóðing og eftirliti av býartorginum í Steinatúni. Zeta Arkitektar hava bjóðað arbeiðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar P/F Articon og Sp/f TG-Verk.

Tilboðini eru soljóðandi:

Articon: 3.645.953,00 kr. uttan mvg.
TG-Verk: 2.798.258,00 kr. uttan mvg.

Zeta Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við TG-Verk, sum høvdu lægsta tilboðið, til tess at finna sparingar. Í tilboðnum varð biðið um tvær loysnir á antin holaðar (perforera) koparveggir ella herdaðar glasveggir, soleiðis at byggiharrin sjálvur hevur møguleika at velja. Stødd og snið tað sama, sum lýst í útbjóðingartilfarinum. Niðurstøðan er, at glasið er munandi bíligari frá báðum tilboðsveitarum. Herdað glas er somuleiðis ein tilfarsloysn, ið skapar ljósari sjónligari umhvørvi í býartorginum, í mun til holaðar (perforeraðar) koparplátur. Um tikið verður við hesari loysn og sparingum er tilboðið hjá TG-Verk áljóðandi:

TG-Verk: 1.722.115,20 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera býartorgið í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin er kr. 2.399.664,00 kr. við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum við sparingum. Her er veiting og montering av býartorgi, beinkir, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging v.m. íroknað.

2 mió. eru longu játtaðar av konto 6275 og 400.000,00 kr. við mvg. resta í, um tikið verður av samlaða kostnaðinum. Møguleiki er at fíggja 400.000,00 av konto 7510, bussleiðin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum við sparingum hjá TG-Verk, at játta írestandi 400.000,00 kr. av konto 7510, bussleiðin, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ìskoyti:**
Eftir lisitatiónina hevur TG-Verk viðmerkt, at "tilboðið at gera býartorg í Steinatúni sambært ABF06, §3, stk. 5, ikki longur er bindandi fyri TG Verk Sp/f, tí freistin á 20 dagar langt síðani er farin, og TG Verk ikki hevur lovað at staðið við tilboðini". Niðurstøðan er, at TG-Verk eru leysgivnir av tilboðnum.

Tórshavnar kommuna hevur síðani verið í kontakt við hægra tilboðsveitara, P/F Articon, sum hava váttað, at teir ikki megna at koma niður til prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum. Eftirfylgjandi hevur umsitingin verið í samráð við Sp/f Húsavarðartænastuna, P/F Nomatek og somuleiðis kannað møguleikar í Danmark, men eingin hevur verið áhugaður at gera hetta fyri prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum.

Umsitingin hevur bíðað eftir at bjóða verkætlanina út av nýggjum, tí tilboðini vórðu formelt annulleraði fríggjadagin 24.08.2018. Tískil skal mann smb. ABF06 bíða í 3 mánaðir frá hesum dato, áðrenn møguleiki er at bjóða hetta út av nýggjum, t.e. í fyrsta lagi 24.11.2018.

Fyri at fáa býartorgið í Steinatúni gjørt, so er ætlanin at bjóða somu verkætlan út enn einaferð í innbodna lisitatión til hesar arbeiðstakarar:

Sp/f Búsetur
Sp/f ÁTS
Sp/f Húsavarðartænastan
Sp/f Norðhús
P/F Articon
P/F MT/Højgaard

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera verkætlanina býartorg í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini, j.nr. 14/05065-77. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið á býartorg í Steinatúni út aftur eftir omanfyristandandi leisti, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Hálvtak á býartorginum Steinatún:**
Lisitatión var fyri verkætlanina Býartorg í Steinatúni tann 25. januar 2019. Bara ein arbeiðstakari møtti upp, og tað var Sp/f Húsavarðartænastan. Teirra tilboð var áljóðandi: 3.097.245,37 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting áljóðandi 3.998.986,00 at gera verkætlanina Býartorg í Steinatúni liðugt. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

2,4 mió. eru longu játtaðar til verkætlanina Býartorg í Steinatúni. Sostatt manglar 1,6 mió. at gera verkætlanina Býartorg í Steinatúni liðugt.

**Dagføring av flísaálegging:**
Í sambandi við lokaðu verkætlanina at leggja flísar á torgið í Steinatúni, sum ikki vísir seg at vera nøktandi í mun til val av tilfari og onnur viðurskifti, er ynski lagt fram um at bøta um torgið og teir manglar, ið eru á staðnum. Talan er um brotnaðar flísar, ójavna yvirflatu, kantar millum torg og koyribreyt, trappu við ov lágum trapputrinum og vantandi gongulinjur til sjónveik.

Zeta Architects hava gjørt uppskot til eina uppstigan av torginum í Steinatúni, sum tekur atlit til leiðlinjur fyri sjónveik, atgongd fyri rørslutarnað, gliðtrygga yvirflatu, tunga ferðslu og stødd á flísum. Størri krøv eru somuleiðis sett til nýggjar flísar. Steinatún er ein liður í eini størri

heild, og hava Zeta Architects somuleiðis gjørt uppskot við somu treytum til nýggja flísaálegging á gongugøtuni, frá Steinatúni og oman til Vaglið, sí uppskotið "Gongugøtan". Fyri at skapa eina betri og samanhangandi heildarmynd av miðbýnum tørvar gongugøtan somuleiðis eina uppstigan, og ber hon bráð av nógvum sløgum av flísum, brotnaðum flísum og einum sundurskildum býarrúmi.

Umsitingin mælir til at arbeiða víðari við uppskotinum "Gongugøtan", har neyðugar tillagingar verða gjørdar, umframt at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri ráðgeving, prosjektering og arbeiðstøku av uppskotinum.

**Skjøl:**
Gongugøtan, journal nr. 14/05065-83.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

1. At taka av tilboðnum fyri býartorgið, fara í sáttmálasamráðingar og undirskriva arbeiðstakarasáttmála við Sp/f Húsavarðartænastuna og játta írestandi pening áljóðandi 1 mió. kr. av konto 6275, L62034 Vágsbotnur - skipan av økinum og 600.000 kr. av L00001 Íløgukarmur fyri árið 2019 til L62029 Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýli og norðara síðan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
2. At umsitingin arbeiðir víðari við uppskotinum at uppstiga torgið, at játta kr. 200.000 til ráðgeving av konto 6275, L00001 Íløgukarmur fyri árið 2019 til L62027 Miðbýarætlan - Steinatún, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 39/19 Havnadalur - fríøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 176/17 | 17/02248-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 247/17 | 17/02248-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 57/17 | 17/02248-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 307/17 | 17/02248-1 |
| 5 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 309/17 | 17/02248-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 18/19 | 17/02248-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 45/19 | 17/02248-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 39/19 | 17/02248-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
*Tey grønu økini og frílendini í kommununi verða varðveitt og náttúrufriðað.*
*Tey skulu verða meira atkomulig við høgligum lendisgøtum*
*Kommunan eigur eisini, eftir miðvísari ætlan, at planta fleiri trø og lýsa skógfriðað øki.*

Ynski er um at greina møguleikarnar í Havnardali.

Økið liggur í ovara parti av Havnardali, frá vatnbyrgingini til brúnna um Sandá við landsvegin vesturum.

Dalurin er skapaður av jøkulsísi, við mórenuheyggjum og Sandá í botninum. Vendir í út.norð og ls. Vatnbrunnurin liggur á 160 m yvir havið og brúgvin á uml. 130 m. Longd og breidd er ávikavist 2 km og 1 km. Samla vídd er uml. 2,5 mill. $m^2$. Dalurin liggur inni í landinum og er miðalhitin eini 2 stig lægri enn í býnum.

Sandá er mark millum Flatnahaga og hagarnar vestanfyri. Í Flatnahaga er størsti parturin av láglendinum lagdur út til traðir og nakað til viðarlund. Vestanfyri ánna er hagi, festijørð við vanligum seyðahaldi og nakað av veltum lendi til fóðurframleiðslu.

Viðarlundarøkið úti í Havnardali.
Tórshavnar kommuna og Skógfriðingarnevndin samstarvaðu í sjeytiárunum um at fáa til vega eitt størri samanhangandi øki til gróðurroyndir. Kommunan játtaði at lata skógarfriða eitt øki burturav Álakershaganum matr.nr. 1160a. Í 1974 varð lisið skógfriðingarbræv uppá ein part av Álakershaganum uml. 283.000 $m^{2,}$ uml. 28 ha. Økið liggur ímillum Sandvegin, Sandá, vatnbrunnin í Havnardali, og vegin frá vatnbrunninum um ruskstøðina aftur til Sandvegin.

Stika og byrja at gróðurseta varð í 1975. Seinni er velt, drenað og plantað meiri. Seinastu 5 árini eru 1,3 km av góðum lendisgøtum skipaðar. Skógrøkt landsins og Tórshavnar kommuna hava staðið fyri arbeiðinum.
Økið verður dúgliga vitjað, og góðveðursdagar er fitt av fólki á staðnum, og er tað eitt ynda summarútferðarstað hjá havnarborgarum við ánna.
Í 1960'unum varð stórt vatnverk bygt innast í botninum í Havnardali. Stór grótbyrging, ið rúmar 550.000 $m^3$ av vatni. Í dag veitir vatnverkið í Havnardali uml. 25% av vatninum til býin undir vanligum umstøðum. Stór vatnleiðing er løgd oman gjøgnum dalin, og sæst farvegurin í lendinum. Ætlanir hava verið at byggja nýtt vatnreinsiverk í Havnardali í nøkur ár.

Traðir vórðu lagdar inn í Havnardali frá 1930'unum og nógv er velt. Mett verður ikki, at hetta er gott gróðrarlendi til landbúnað, gras, epli, røtur v.m.

Í 90'unum, tá fíggjarkreppan herjaði, vórðu nýggjar traðir lagdar inn. Ymist er sum tær verða nýttar, veltur eru sjáldsamar at síggja. Flestu verða nýttar til seyðahald og ross. Traðirnar eru uml. 1 ha (10.000 m $^2$) til víddar í miðal.

Ruskstøðin í Havnardali var nærmasti granni til viðarlundina. Tá ruskstøðin varð tikin niður, varð økið breitt við mold og avgrevstri, og er í dag grasgrógvið. Hetta hevur stundum verið umrøtt í fjølmiðlunum, tí leivdir av ruski og rustvatni hava misprýtt. Nakað av hesum er nú hampað, og veitargrevstur grivin at forða vatni at seta undir dungan. Umhvørvisstovan hevur gjørt kanningar, ið vísa dálkingarstøðuna í nærumhvørvinum.

Ríðingarfeløgini halda til í niðasta parti av dalinum eystan fyri Sandá. Har er eisini virksemi við barnaansing, skótavirksemi og entreprenørplássi, ið er stórt lýti fyri økið.

Góðar lendisgøtur eru gjørdar fram við Sandá og gjøgnum Flatnahaga.

Velbastaðmegin er stórur mold- og avgrevstrardungi, ætlaður at slætta til graslendi. Misprýðir í lendinum.

Nakrar forðingar og bindingar til ynski um at planta og skógfriða, er verandi nýtsla av lendinum. Havnamegin er meginparturin av lendinum traðir og vestanfyri eru hagar og seyðahald.

Vatnverkið og drekkavatnsinnvinning setir avmarkingar at nýta lendið, ið veitir vatnið til byrgingina.

Vegurin út í dalin er í vánaligum standi, tí undirlendið er ov bleytt.
Ymisk onnur áhugamál hava verið frammi um venjingarkoyribreyt, motorcross o.a.

Landslagsgreiningar eru í fleiri førum gjørdar av lesandi landslagsfrøðingum, og kunna hesar nýtast til at finna øki at gróðurseta í framtíðini.

Í 2017 varð serligt øki stikað inni, at taka ímóti ridluskriðamold.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Náttúrufriðing, fráleiki til áir, ið eru breiðari enn 4 m, og til viðarlundir

Skógfriðingarlógin

Fornfriðingarlóg, leivd eftir siðsøgu, rættir og kráir

Umhvørvisverndarlóg, dálkingarstøðan í Sandá v.m.ruskstøðin, Innflyting av plantum

Hagalógin, ognarviðurskifti og Matrikullógin,Búnaðarstovan Búnaðargrunnurin eigari av lendi

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nýtt reinsiverk hevur verið í umbúnað í nøkur ár. Einki ítøkiligt sambært býarverkfrøðinginum.

Umhvørvisdeildin arbeiðir við at tyrva gamla dungan har brennistøðin stóð eftir ávísing frá Umhvørvisstovuni, og at fáa ruddað entreprenørplássið við ríðifjósini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Jarðar- og traðarbrúkið í dalinum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Byggisamtyktin fyri økið, D1 og 4. grundumráði.

**Umhvørvisárin stig 3-4**
Dálkingarstøðan í Sandá av yvirtaðing v.m. á traðum og avfall frá alistøðini hjá Føroya Sílaveiðifelag

**Fíggjarlig viðurskifti**
500.000 kr. til tiltaksætlan (dispositiónsætlan), at fíggja á løguætlan fyri 2018

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Verður sent øðrum deildum til viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Verður sent til mynguleikaviðgerð

**Skjøl:**
Havnardalur_Yvirlitskort, journal nr. 17/02248-2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at gera skipanarætlan fyri Havnardal, við atliti at skógarfriðing, gróðurseting, atkomuviðurskiftum og frítíðarupplivingum, og at játta kr. 500.000 av íløgunum fyri 2018 til ætlanargerð, umframt at senda málið til ummælis í mentamálanevndini og teknisku nevnd fyri síðani at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Peningur er tøkur á íløgukonto 6275 Fríðkan av kommununi.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini og teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskot:**

Stutt fyri jól 2018 bað umsitingin Ósbjørn Jacobsen Arkitektar um at gera eina yvirskipaða frílendisætlan fyri ein part av Havnardali, ið skal lýsa hvussu økið í framtíðini skal mennast og skipast. Økið, ið verður umtalað, spennir seg frá vatnbrunninum og oman til Velbastaðvegin og er gott 2,5 $km^2$ til støddar.

Skipanaruppskotið byggir á ein yvirskipaðan spurning; hvussu kann økið – eisini í framtíðini – verða varðveitt sum rekreativt frítíðarøki, uttan at man læsir økið so mikið, at ein natúrlig menning ikki er møgulig?

Skipanaruppskotið byggir í høvuðsheitinum á trý fokusøkir; hesi eru:

- Lýsing av økinum, ið inniber verandi skipan, dygdir, manglar og tøvur í dag.
- Framtíðarmenning; styrkja um núverandi dygdir, økja um náttúru margfeldið og nýggjar náttúru upplivingar.
- Programmering av økinum; sambond og útvíðkan av gøtukervinum, øki til uppihald og rekreatión, framtíðar gróðurseting og menning av viðarlund og eina yvirskipaða ætlan í stigum.

Økið úti í Havnardali er sera fjølbroytt, tað er samansett av ymiskum blandaðum funktiónum og harvið ymiskum brúkarum. Alt frá rossa, síla-, og traðarfólkum, skótum, barnagørðum og øðrum vitjandi.

Sjálvt lendið er serstakt við bleytum morenu-heyggjum, vátlends fløtum, mýrulendi, traðum, eini skógarfriðaðari viðarlund við nálatrøum og runnum, smáum gøtum og ánni Sandá, ið greinar seg ígjøgnum lendið. Hesin fjølbroytti lendisskarin ger, at økið hevur nógvar góðar dygdir og menningarmøguleikar, ið eru týðandi fyri skipanina av økinum.

Skipanaruppskotið leggur upp til, at fremja ætlanina í stigum. Átøkini, ið skulu gerast, skulu stiga undir tær dygdir, ið økið hevur í dag og lagt er upp til, at farast skal hóvliga fram. Niðanfyri sæst uppskot til átøk:

1. Nýggj gróðurseting, sum styðjar uppundir verandi viðarlund, og sum samstundis virðir serstaka landslagið í dalinum.
2. Víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum
3. Fleiri benkur fram við gøtunum
4. Lætta um atgongd tvørtur um ánna á ávísum støðum, við at gera smáar timburbrúgvar
5. Útsýnisstøð frá hægstu heyggjunum
6. Smá skýli - “shelters” - ið kunnu nýtast til uppihald, lívd og til at gista í
7. Vesi og rennandi vatn
8. Skráseta og markera mentanararv í økinum - m.a. endurlaga gomlu rættina á sunnara partinum
9. Friða vestara áarbakka fyri landbúnaði og nýta hann til rekreativt øki.

**Átøk:**
Skipanaruppskotið leggur upp til at farið verður undir nevnd átøk og at átøkini skulu fremjast í stigum. Í fyrstu syftu er ætlanin at fara undir átøk 1, 2 og 3.

Átak 1 inniber at niðurleggja nakrar av teimum sunnaru leigutraðunum, ið liggja uppat verandi viðarlund *(Sí skjal Nýggj gróðurseting)* og fara í samráðingar við friðingarmyndugleika um víðkan av  verandi skógarfriðing, við tí fyri eyga at kunnu hegna, drena og byrja uppá nýggja gróðurseting. Meðan átak 2 og 3 umfata lendisgøtur og beinkir.

**Skjøl:**

- *Journal nr.:17-02248-12 HAVNADALUR FRÍLENDISÆTLAN DESEMBER 2018_Ósbjørn Jacobsen Arkitektar*
- *Journal nr.:17-02248-12 Nýggj gróðurseting*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir átøk 1, 2 og 3, at játta 700.000 kr. av L00001 á L62033 Havnadalur - fríøkið til at fremja átøkini og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 40/19 Landavegur 3. Byggistig, frá Heygsvegnum til Marknagilsvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2019 | 3/19 | 19/00501-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 43/19 | 19/00501-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 40/19 | 19/00501-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 19/00501-1 |

**Upprunin til málið:**
Sum framhald av kloakkarbeiðinum frá Frælsinum til rundkoyring við Íslandsveg/Heygsveg, er ynski um at fara í gongd við 3. byggistig, sum er vegastrekkið Landavegur frá rundkoyringini við Heygsvegin til Marknagilsvegin.

Av tí at Fjarhitafelagið hevur ætlanir um at fara í gongd við at leggja nýggja fjarhitaleiðing á hesum strekki í vár, hevði tað verið ein fyrimunur at kloakk, regnvatn og vegbreyt verður dagført samstundis. Arbeiðið hjá Fjarhitafelagnum er umfatandi og verður stórt inntriv gjørt á vegbreyt. Sí yvirlitstekning og tvørskurð, j.nr. 19/00501-4.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at dagføra og skilja sundur kloakkir frá felagsleiðingum, dagføra vatnleiðing og dagføra Landavegin við súkklu- og gongubreyt.

Kloakkin í Perskonugøtu er í sera ringum standi og brotin í fleiri støðum, tí er átrokandi at fáa hetta í rættlag, somuleiðis tvídeiling av kloakk- og regnvatn, tá talan er um felags ø500 leiðing at leggja út í Landavegin.

Í sambandi við komandi íbúðarbygging á Fløtum, er neyðugt at leggja eina kloakk til hesa útstykking, og at leggja nýggja regnsvatn til ánna, sum má leggjast í rør.

Í sambandi við skúlabyggningina, eru ferðsluátøk við vegamótið Hans Andriasar gøta og við vegamótið Landavegur/Marknagilsvegur projekterað, og eigur hetta at verða gjørt undir somu arbeiðstøku.

Partur av vatnleiðingini í Landavegnum er gomul ø250 etrenit-leiðing sum skal dagførast.

Somuleiðis skulu SEV og FT leggja leiðingar í vegin.

Sí Fundarfrásøgn frá fundi við allar leiðingsánarar j.nr. 19/00501-2.

Verkætlanin skúli á Fløtum verður liðug til skúlaársbyrjan á sumri 2020, og er tað tí umráðandi at hetta arbeiði verður liðugt áðrenn, tá eitt enn størri ferðslutrýst verður á Landavegnum.

Sjálvur vegurin eigur at verða dagførdur og ferðslutryggjaður samstundis, nú meira enn 3000 næmingar skulu til og frá skúlunum í Marknagili.

Arbeiðið at leggja fjarhitaleiðing, kloakk- og aðrar leiðingar, umframt at ferðslutryggja og dagføra Landavegin, væntast at taka uml. 13-14 mánaðir.

Ætlanin hjá Fjarhitafelagnum er at bjóða arbeiðið út seinast 1. mars 2019.

**Skjøl**
Fíggjartørvur, j.nr. 19/00501-6
Tekningar, j.nr. 19/00501-4
Fundarfrásøgn, j.nr. 19/00501-2

Tilmæli kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at kommunan fer undir at dagføra Landavegin, 3. byggistig og at umsitingin innheintar tvey undirhondsboð at leggja fyri teknisku nevnd til góðkenningar.

Samlaði fíggjartørvurin til verkætlanina er kr. 17,5 mió. við 6,25% mvg. Ætlanin er, at arbeiðið skal byrja í apríl 2019 og verða liðugt á sumri 2020, og mælt verður til:

at í 2019 verða játtaðar kr. 8 mió. soleiðis:
- Kr. 1.067.000 av kt. 8175 – L81024, umskipan av Velbastaðvegnum
- Kr. 1.000.000 av kt. 8112, asfalt rakstur 2019
- Kr. 600.000 av kt. 6875, íløgur – L00001 2018 kloakkir sum ikki eru merktar
- Kr. 2.000.000 av kt. 6875, íløgur – L00001 2019 kloakkir sum ikki eru merktar
- Kr. 727.000 av kt. 8175 – L81003, Glyvursvegur brúgv um Sandá
- Kr. 2.400.000 av kt. 6810, kloakk rakstur í 2019
- Kr. 275.000 av kt. 8175 - L81017, Hóvabrekka

at írestandi fíggjartørvurin verður játtaður sum íløga í 2020.

at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 12. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 41/19 Komandi útbjóðing av bussleiðini - útbjóðingartilfar og gerð av nýggjari farleið og ferðaætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.06.2017 | 36/17 | 17/01513-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 69/17 | 17/01513-6 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.02.2019 | 2/19 | 17/01513-6 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 71/19 | 17/01513-6 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 58/19 | 17/01513-6 |
| 6 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 41/19 | 17/01513-6 |

**Málslýsing:**
Sáttmálin, sum Tórshavnar kommuna hevur um Bussleiðina við Sp/f Gundur´s bussar er framlongdur við einum ári fram til 1. apríl 2019.

Ì Tórshavnar kommunu er Bussleiðin eitt tilboð til borgarin. Kommunan hevur tað fatan, at tað eru teir somu trúgvu borgarir, sum brúka Bussleiðina dagliga.

Høvuðs endamálið at endurskoðað alla Bussleiðina er fáa eina betri busstænastu og farleiðir innanfyri núverandi fíggjarkarmar og fleiri brúkarir.

Umsitingin á teknisku deild hevur verið í samskifti við nakrar fyritøkur, sum hava royndir at arbeiða við kollektivari ferðslu.

A/S COWI hevur sera drúgvar royndir og hevur í nógv ár arbeitt við kollektivari ferðslu, serliga í Danmark. Eisini hava teir arbeiðsroyndir í Norra, Íslandi og Grønlandi.

Ætlanin er, at COWI skal veita ráðgeving til komandi útbjóðing av Bussleið, herundir útbjóðingartilfar av nýggjari farleið og ferðaætlan.

Fíggjar viðurskiftir:
Samlaða tilboðið frá A/S COWI er íalt kr. 708.500,00. Játtanin er tøk á konto 7510

Tilboðið umfatar at endurskoða alla Bussleiðina.
Eftirmeta ferðafólkatøl
Datagrundarlag og viðgerð av hesum í mun til komandi farleiðir
Gerð av farleiðum
Verkstovur við borgara luttøku
Viðgerð av úrslitinum frá borgara fundum

Eftir ætlan skal COWI verða liðugt við uppskot til nýggja farleið 1. februar 2018.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum íalt kr. 708.500,00 frá COWI A/S, og játta upphæddina av konto 7510.

**Tekniska nevnd 06. juni 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum men mælir til at brúka verandi tilfar.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
COWI hevur gjøgnumgingið ferðafólkatølini og hugt eftir ferðafólkamynstrinum á teimum ymisku farleiðunum bæði í Havn og úti á bygdunum. Fyri at vita hvørji ynskir og tørvur eru úti á bygdunum var fundur við staðbundnu nevndirnar úr Kollafirði, Kaldbak, Hvítanesi, Velbastað og Kirkjubø. Fundur var eisini við SSL og ein fylgibólk við umboðum frá handilslívinum/kunningarstovuni, Landssjúkrahúsinum, Eldraráðnum, Gundur´s bussar, bussførarum, næmingaráðnum og leiðsluna á Glasir.

Umframt fundir við umboð fyri bygdirnar og fylgibólkin, vóru eisini tvær spurnarkanningar gjørdar á www.torshavn.fo. Ì tí fyrru spurnarkanningini, sum var í september 2017, varð serliga spurt inn til nøgdsemi við núverandi Bussleið og svaraðu 1092 borgarar. Ì seinnu spurnarkanningini, sum varð  í februar 2018, varð serliga spurt inn til ynskini til komandi ferðaætlan hjá Bussleiðini og svaraðu 1649 borgarar.

Eftir at hava gjøgnumgingið ymiskar upplýsingar frá fundum og ferðafólkatølum, vóru eisini gjørdar handligar ferðafólkateljingar. Eisini varð hugt eftir, hvussu svarað varð í báðum spurnarkanningunum um Bussleiðina. Grundað á omanfyri nevndu kanningar, fundir, innsavnan av tilfari og annað, er COWI komið við niðanfyri standandi uppskoti til ferðaætlan.

Uppskot til nýggja ferðaætlan:
Býurin er í støðugari menning, og tí er týdningarmikið at bussleiðin verður endurskoðað, soleiðis at bussleiðin tillagar seg býarvøksturin og gerst enn betri og tíðarhóskandi.

Uppskot til nýggjar leiðir og tíðir fyriliggur.

Umsitingin arbeiðir eisini við átøkum á umhvørvisøkinum, eitt nú miðla átak, har kommunan eggjar borgarum til at velja Bussleiðina og har ljós verður varpað á umhvørvisligu fyrimunirnar við at nýta bussleiðina.

Koyring í Havn
Uppskotið til nýggja ferðaætlan fer burtur frá tí hugburði, at tað skal koyrast allastaðni hvønn 20 min. Uppskotið tekur støði í ferðafólkamynstrinum og hvar flest fólk ferðast mest. Uppskotið leggur upp til tvær høvuðsleiðir, sum koyra 15. hvønn min. og tvær síðuleiðir, har tað verður koyrt hvønn 30. min.

Lagt verður upp til at Bussleiðin koyrir nógv fleiri tímar, títtleikin verður oftari um dagin á leiðunum í Havn. Koyrt verður frá áleið kl. 07.00 og fram til áleið 18.00, eftir hetta verður koyrt einaferð um tíman til kl. 23.00 Koyrt verður longur leygardag frá kl. 10.00 til 23.00 (fyrr 10.00 til 16.00) og ætlanin er at koyra sunnudag frá kl. 10.00 til 21.00.

Hesar báðar leiðirnar koma at koyra hvønn 15. min.:
- Høvuðsleið 1 Hamarin – Hoyvík – Hamarin
- Høvuðsleið 2 Norðasta Horn – á Háls – Norðasta Horn
-

Hesar báðar leiðirnar koma at koyra hvønn 30. min.:
- Síðuleið 3 AB-vøllur – Hoyvík – AB-vøllur
- Síðuleið 4 Millum Gilja – Steinatún – Millum Gilja
-

Busskoyring verður til bygdirnar gerandisdagar frá áleið kl. 07.00 til 18.00. Koyringin til Sandvíkarhjalla verður samskipað við leið 6 og 7.

Núverandi sáttmála við Gundursbussar eru 31.133 effektivar koyritímar og við nýggju víðkaðu ferðaætlanini kemur effektiva tímatalið uppá 35.599 tímar.

Hesar leiðir eru vístar á skjali j.nr. 17/01513-17.

<u>Marknagil-leiðin:</u>
Havandi í huga miðsavnan av Skúlanum á Fløtum, Musikkskúlan, Glasir og tað ovur stóru mongd av ferðandi næmingum, lærarum og onnur, er neyðugt við einari bussloysn afturat. Ætlanin er at seta inn eina “Marknagil-leið”, sum skal koyra skúladagar (uml. 200 dagar um árið), frá áleið kl. 07.30 til kl. 16.00.

Hendan leiðin er víst á skjali j.nr. 17/01513-18.

<u>Koyring til bygdirnar um kvøldið og í vikuskiftinum</u>
Staðbundnu nevndirnar og íbúgvarnir á Velbastað/Kirkjubø, Kaldbak og Kollafirði hava í fleiri ár ynskt at fáa vikuskiftis koyring til og frá Havnini.

COWI hevur gjørt uppskot til at royna Tele-taxa ella Flex-bus. Hesar skipanir verða brúktar nógva staðni í útjaðarinum í Danmark og mælir Cowi til at vit brúka Flex-koyring til bygdirnar um kvøldið og í vikuskiftinum.

Eftir ætlan skal Flex-koyring verða gerandiskvøld frá kl. 18.00 til 23.00 (tveir túrar), leygardag frá kl. 10.00 til 23.00 (seks túrar), sunnudag frá kl. 10.00 til 21.00 (fýra túrar).

Flex-koyring verður ikki gerandis kvøld til Kollafjarðar, tí tá koyrir Bussleiðin.

<u>Um Flex-koyring:</u>
Flex-koyring er ein skipan, har ein veitari fær ábyrgd at avgreiða koyringina fyri kommununa til bygdirnar. Flex-bussurin koyrir til fastar tíðir bæði úr Havn og úr bygdunum. Koyrt verður frá ávísum buss steðgiplássi í Havn, og steðgar við ávís buss steðgipláss á bygdunum. Tey ferðandi, sum skulu við einum flex-túri, skulu boða veitaranum frá minst 2 tímar áðrenn túrin. Er eingin fráboðan komin, verður eingin túrur koyrdur.

Veitarin av Flex-koyringini fær eina fasta upphædd fyri hvønn koyrdan túr. Veitarin fær eitt minni gjald fyri at vera tøkur, sjálvt um tað ikki verður koyrt, og kann tá koyra aðrar túrar.

Ùtbjóðingartilfar til Flex-bus koyring til bygdirnar um kvøldið og í vikuskiftinum verður ikki klárt til 1. apríl 2019 og kann hendan tí ikki verða klár fyrr enn 1. apríl 2020, tá núverandi framlongdi sáttmáli við Sp/f Gundur´s bussar gongur út.

Samráðingar við Sp/f Gundur´s bussar:
Umsitingin hevur havt samráðingar við Sp/f Gundur´s bussar um at seta nýggju skipanina við víðkaðu ferðaætlanini í verk frá 1. apríl 2019, umframt at teir átaka sær at koyra kvøld- og vikuskiftiskoyring til bygdirnar, sum eina royndartíð fram til 1. apríl 2020, tá longdi sáttmálin við Sp/f Gundur´s bussar gongur út.

Eftir at samráðingarnar eru lidnar, eru vit komin fram til:

| Leiðir: | Árligur kostnaður | 2019 (9 mðr.) |
|---|---|---|
| Leið 1 – 7 | kr. 26.224.948 | kr. 19.668.711 |
| Marknagil-leiðin | kr. 947.037 | kr. 710.278 |
| Bygdir kvøld og vikuskifti | kr. 1.066.667 | kr. 800.000 |
| Íalt: | kr. 28.238.652 | kr. 21.178.989 |

Verandi játtan til gjald fyri bussleiðina er (standard roknskaparkonto 147990) fyri 2019 kr. 24.149.000.

Nýggja skipanin við víðkaðu ferðaætlanini kemur at hava ein árligan meirkostnað uppá kr. 4.090.000 (28.238.652 – 24.149,000).

Verður skipanin sett í verk frá 1. apríl 2019, verður meirkostnaðurin fyri 2019 kr. 3.067.000, umframt útreiðslur til tvær buss endastøðir, at taka buss steðgistøð burtur sum ikki koma at verða nýtt, skelting, nýggj ferðaætlan, lýsingarátak, kt-loysnir v.m., fyri íalt kr. 500.000.

Samlaði fíggjartørvurin fyri 2019 verður sostatt kr. 3.567.000.

Skjøl:

| | |
|---|---|
| Verandi leiðir | j.nr. 17/01513-16 |
| Nýggju leiðirnar 1-7 | j.nr. 17/01513-17. |
| Marknagil leiðin | j.nr. 17/01513-18. |
| Framløga frá Cowi | j.nr. 17/01513-20 |
| Fíggjarligar útrokningar fyri 2019 | j.nr. 17/01513-21 |

Tilmæli kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at kommunan ger avtalu við Sp/f Gundur´s bussar, um at seta í verk nýggju skipanina sum eina royndarskipan frá 1. apríl 2019, herundir leið 1 – 7, Marknagils-leiðina og bygdir kvøld og vikuskifti, sum lýst omanfyri.

Mælt verður til:
- At meirkostnaðurin í 2019, áljóðandi kr. 3.567.000 verður játtaður av stovnsnummar 4176, verkætlan L41012. Lánta upphæddin verður løgd omaná aftur hesa verkætlan í 2020.
  At málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. februar 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt

# 42/19 Golfvøllur – broyting av byggisamtykt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 22/19 | 19/00427-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 30/19 | 19/00427-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 22/19 | 19/00427-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 46/19 | 19/00427-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 42/19 | 19/00427-1 |

**Upprunin til málið:**

Í 2017 varð samtykt at taka uppaftur samráðingarnar um lendi til golfvøll á Glyvursnesi og at endurskoða verkætlanaruppskotið til golfvøll á Glyvursnesi, sum varð gjørt í 2013.

Golfvallarætlanin er skipað við 18 holum, men er ætlanin einans at byrja við at byggja vøllin við 9 holum, sí s. 7 í skjalinum *Verkætlan golfvøllur á Glyvursnesi 2017.pdf.*

Økið, sum ætlanin er at nýta til golfvirksemi, liggur í D2 øki og í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Um loyvi skal verða at spæla golf á øllum økinum, má hetta broytast til D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Tórshavnar Golffelag varð stovnað í 1989. Fyrstu árini varð spælt uppi á Vatnaskørðum á lendi, sum varð leigað frá bóndanum, og seinnu árini hevur felagið spælt á lendinum hjá bóndanum úti á Glyvursnesi. Í báðum førum hevur talan verið um óviðgjørdan golfvøll, t.v.s. at lendið ikki er gjørt til golf.

Í 2013 varð eitt verkætlanaruppskot sent Tórshavnar býráði um nýggjan golfvøll á Glyvursnesi, og í 2017 varð hetta, eftir áheitan frá býráðnum, tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum – 3 hol um árið, við møguleika fyri at byggja vøllin út til 18 hol seinni. Sambært uppskotinum verða tey fyrstu nýggju holini klár í 2021-22.

Sum liður í heildarætlanini fyri golfvøllin, verða somuleiðis umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum. M.a. vísir frágreiðingin á dømi úti í heimi, har grótbrot eru integreraði við golfvallir.

Í heildarætlanini fyri golfvøllin, verður gamla grótbrotið nýtt til venjing, undirvísing og upphiting. Hendan ætlanin er tó ikki partur av fyrsta stigi í verkætlanini, og av tí, at gamla grótbrotið verður nýtt til annað virksemi í løtuni (Hjálpirót og annað vinnuligt virksemi), verður mælt til, at hetta økið framhaldandi liggur sum B11 vinnuøki, og verður broytt til D2, tá golfvallarætlanin er komin longur.

Í sambandi við nýggja grótbrotið á Glyvursnesi, so fer umsitingin hjá Tórshavnar kommunu, saman við LOA-fonden (lokale og anlægsfonden), undir at kanna møguleikarnar til virksemi við nýggja grótbrotið, og verður almenna byggisamtyktin fyri økið við nýggja grótbrotið væntandi broytt sambært hesum ætlanum

**Lógir, ásetingar o.a.**

Ásetingar fyri D2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru:

*§23, stk. 3 Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum*

*Stk. 5 Byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5.*

*Stk. 6 Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:

*§26, stk. 1 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 2 Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna samskiftir í løtuni við Búnaðarstovuna um at útvega lendi til golfvallarætlanina, sí mál *Tórshavnar golfklubbi: umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi,* journal nr. 14/04756.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*LOA-fonden: Undersøgelse af idræt og kultur på Færøerne,* journal nr. 18/01114.
*Tórshavnar golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi,* journal nr. 14/04756.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Eftir broyting,* journal nr. 19/00427-4
*Áðrenn broyting,* journal nr. 19/00427-4
*Verkætlan golfvøllur á Glyvursnesi 2017,* journal nr. 19/00427-3.
*Verkætlanaruppskot til golfvøll á Glyvursnesi 2013,* journal nr. 19/00427-3.
*Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi,* journal nr. 14/04756-36.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. februar 2019 | Blað nr.: 181<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið við golfvøllin á Glyvursnesi sambært kortskjali, j.nr. 19/00427-4 og beina málið í býráðið**.**

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:**Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 43/19 Nýggj byggisamtykt fyri Hest

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hest/Koltursnevndin | 03.09.2018 | 3/18 | 18/02019-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 21/19 | 18/02019-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 43/19 | 18/02019-1 |

**Upprunin til málið:**
Ì løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir stendur m.a:

*§4, stk. 3. Allar kommunur skulu í seinasta lagi 31. desember 2010 hava sent landstýrismanninum byggisamtykt til góðkenningar fyri allar bygdir í kommununi. Í kommunum við fleiri bygdum verður hvør bygd mett fyri seg í mun til tørv á byggilendi til tey ymisku endamálini, ið eru góðkend í byggisamtyktini.*

Eingin byggisamtykt er í Hesti, og tí skal uppskot til eina gerast. Í byggisamtyktini verður tann byggingin, ið er, skrásett, og nýggj øki verða skipað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir:

"§1, stk. 2. Tórshavnar kommuna skal, áðrenn 3 ár eru liðin, aftaná henda lóg er komin í gildi, hava fingið í lag eina býarskipan fyri Tòrshavnar kommunu. Landstýriðsmaðurin kann tó eftir áheitan frá Tórshavnar býráð, og um býarskipanarnevndin smb. 2. gr. játtar tí, leingja hesa tíðarfreist."

"§4, stk. 2. Hevur ein kommuna samsvarandi §1 fingið í lag býarskipam, skal hon í seinasta lagi 1 ár aftaná, at henda býarskipan er góðkend, senda landsstýrismanninum til samtyktar uppskot til byggisamtykt fyri tað økið, býarskipanin umfatar. Landsstýrismaðurin kann tó loyva, at byggisamtyktin bara skal umfata ein part av býarskipanini."

"§4, stk. 3. Allar kommunur skulu í seinasta lagi 1. desember 2010 hava sent landstýrismanninum byggisamtykt til góðkenningar fyri allar bygdir í kommununi. Í kommunum við fleiri bygdum verður hvør bygd mett fyri seg í mun til tørv á byggilendi til tey ymisku endamálini, ið eru góðkend í byggisamtykt. Góðkendar byggisamtyktir skulu endurskoðast og sendast landsstýrismanninum til staðfestingar fimta hvørt ár."

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at eingin byggisamtykt er í Hesti, ber m.a. ikki til at avgreiða byggimál og matrikkulmál í Hesti. Tórshavnar kommuna fær m.a. umsóknir um keyp av grundstykki í Hesti, men av tí at eingin byggisamtykt er í økinum, ber hetta ikki til.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fleiri fyrispurningar eru um keyp av grundstykki í Hesti, m.a. mál nr. 18/02020 – *Guðrið Joensen: fyrispurningur um keyp av grundstykki í Hesti.*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

Umboð frá býarskipanardeildini kemur inn at greiða frá málinum og ynskir viðmerkingar frá staðbundnu nevndini.

**Hest/Koltursnevndin 03. september 2018:** Umboð frá býarskipanardeildini greiddi frá málinum og at arbeitt verður víðari og at hava ein borgarafund seinni í ár.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við byggisamtyktini og er uppskot til byggisamtykt fyri Hest klárt. Byggisamtyktin skipar fyrst og fremst bygdina í økir, í mun til verandi viðurskifti. Harumframt eru tvey nýggj øki – eitt bústaðarøki og eitt summarhúsøki.

Byggisamtyktin er skipað við hesum økjum, sí skjal *Býarskipan – Framtíðin*.

- A: Bústaðarøki
- B: Havnaøki
- D: Almennir stovnar og mentan
- E: Neyst og bátpláss
- F: Frítíðar- og summarhús
- 4. Grundumráði: Landbúnaður og alment frílendi.

Nýggja bústaðarøkið er staðsett eitt sindur norðan fyri bygdina, ímillum verandi sethús og kirkjugarðin. Eitt sindur av frástøðu er ímillum bygdina og nýggja sethúsaøkið, hetta fyri at gera eitt tíguligt skifti frá uppruna bygdini, og nýggja búðstaðarøkinum. Somuleiðis tryggjar frástøðan eitt hóskandi frírúm omanfyri kirkjuna.

Nýggja búðstaðarøkið liggur framvið verandi vegi, soleiðis at kostnaðurin fyri at etablera økið verður hildin niðri. Ongar leiðingar eru í økinum, so hesar mugu leggjast, um ætlanin verður framd.

Beint sunnan fyri bygdina er eitt grundøki, 3300 m$^2$ til støddar, ið Tórshavnar kommuna eigur. Talan hevur áður verið um at staðseta summarhúsøki á hesi ogn, og leggur skipanaruppskotið til byggisamtyktina somuleiðis upp til hetta.

Á borgarafundi í Hesti tann 3. desember 2018, varð m.a. greitt frá nýggju byggisamtyktini fyri Hest, sí skjal *Borgarafundur í Hesti – fundarfrágreiðing.*

Byrjað varð við at greiða frá, hvat ein byggisamtykt er, og at lógarkrav er um, at allar bygdir hava eina góðkenda byggisamtykt. Síðan varð uppskot til byggisamtykt fyri Hest lagt fram. Byggisamtyktin er fyrst og fremst ein skráseting av verandi viðurskiftum, og í ein ávísan mun eisini uppskot til nýggj øki í bygdini.

Tær flestu viðmerkingarnar frá borgarunum snúðu seg um summarhúsøkið, sum sambært uppskotinum er staðsett beint sunnan fyri bygdina. Summarhús grundstykkini verða væntandi uml. 250 $m^2$ til støddar. Ein møguleiki er at gera felags parkering við vegin, og so gøtur niðan og ímillum húsini. Hetta fyri at halda keypskostnaðin lágan.

At enda varð tíðarætlanin fyri arbeiðið at gera byggisamtyktina løgd fram:
- 1. januar 2019: Freist at koma við viðmerkingum, áðrenn uppskotið verður lagt til politiska viðgerð.
- Februar 2019: Politisk viðgerð.
- Mars 2019: Almenn hoyring av byggisamtyktini í 6 vikur.
- Mai 2019: Málið sent til Heilsu- og innlendismálaráðið. Hetta er treytað av, um viðmerkingar/mótmæla koma, í sambandi við almennu hoyringina.

Tá freistin at koma við mótmælum 1. januar 2019 var farin, var eingin viðmerking innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til byggisamtykt fyri Hest sambært skjølunum *Serstøk byggisamtykt – tekstur – 11-10-2018* og Býarskipan - Framtíðin, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

## 44/19 Broyting í almennu byggisamtyktini í sambandi við frílendisætlan við Boðanes - Hoydalar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 261/18 | 18/03528-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 44/19 | 18/03528-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna, Umhvørvisstovan og Søvn Landsins hava í felag gjørt eina Frílendisætlan fyri økið Boðanes – Hoydalar, sí skjal *2017.05 Frílendið Boðanes Hoydalar*. Ein arbeiðsbólkur, við umboðum frá teimum trimum pørtunum, gjørdi eina dispositiónsætlan fyri økið í niðastu Hoydølum, og legði økið til frílendi til gagns fyri almenningin.

Í økinum, sum Frílendisætlanin fevnur um, eru tríggjar ymiskar byggisamtyktir galdandi:

- Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu.
- Serstaka byggisamtykt nr. 7.
- Serstaka byggisamtykt fyri øki fram við Hoydalsá.

Fyri at fremja tey átøk, ið eru lýst í Frílendisætlanini, er neyðugt við ávísum tillagingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum Frílendisætlanin fevnir um, liggur í D1 øki, B4 øki, B5 øki og B10 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Áðrenn broyting*.

Um átøkini, sum eru lýst í Frílendisætlanini, skulu fremjast í verki, mugu tey øki, sum liggja sum B4, B5 og B10 øki í almennu byggisamtyktini, broytast til D1 øki, sí skjal *Frílendisætlan – Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- *Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.*
- *Virkini í hesum umráðisparinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*

Ásetingar fyri B5 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- *Loyvt er einans at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.*
- *Virkini í hesum umráðisparinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*

Ásetingar fyri B10 øki í almennu byggisamtyktini er m.a.:
- *Økið verður kannað miðstaðaendamálum, skrivstovuendamálum, heilsuendamálum o.t. og virksemi, ið hevur samband við hetta.*
- *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 3 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*

Løgtingslóg um náttúrufriðing:
- *§ 2. Stk. 2. Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*
  1) *Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum.*
  2) *Nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi*
  3) *Nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Samstundis sum økið verður broytt til at liggja í D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, verður serstaka byggisamtykt nr. 7 broytt, soleiðis at alt økið liggur í C1 øki í serstøku byggisamtyktini.

Ikki er neyðugt við broytingum í serstøku byggisamtyktini fyri økið fram við Hoydalsá, av tí at samsvar er ímillum ta serstøku byggisamtyktina og Frílendisætlanina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Broyting í serstøku byggisamtykt nr. 7 í sambandi við frílendisætlan við Boðanes – Hoydalar,* journal nr. 18/03529

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er sent til hoyring hjá náttúrufriðingarmyndugleikanum sambært § 2., stk. 2. Punkt 1 og 2.

Svar er komið frá Náttúrufriðingarnevndini um, at tey viðmæla broytingina.

Svar er ikki komið frá Yvirfriðingarnevndini, sum skal geva endaligt loyvi, enn.

**Skjøl**
*Frílendisætlanin – Almenna byggisamtyktin,* journal nr. 18/03528-2.
*Frílendisætlanin – Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 18/03528-2.
*Almenna byggisamtyktin – Áðrenn broyting*, journal nr. 18/03528-2.

*Svar frá Náttúrufriðingarnevndini,* journal nr. 18/03528-8.
*2017.05 Frílendið Boðanes Hoydalar*, journal nr. 18/03528-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt sambært kortskjølunum, treytað av endaligum loyvi frá Yvirfriðingarnevndini, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 45/19 Broyting í serstøku byggisamtykt nr. 7 í sambandi við frílendisætlan við Boðanes - Hoydalar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 262/18 | 18/03529-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 45/19 | 18/03529-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna, Umhvørvisstovan og Søvn Landsins hava í felag gjørt eina Frílendisætlan fyri økið Boðanes – Hoydalar, sí skjal *2017.05 Frílendið Boðanes Hoydalar*. Ein arbeiðsbólkur, við umboðum frá teimum trimum pørtunum, gjørdi eina dispositiónsætlan fyri økið í niðastu Hoydølum, og legði økið til frílendi til gagns fyri almenningin.

Í økinum, sum Frílendisætlanin fevnur um, eru tríggjar ymiskar byggisamtyktir galdandi:

- Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu
- Serstaka byggisamtykt nr. 7
- Serstaka byggisamtykt fyri øki fram við Hoydalsá.

Fyri at fremja tey átøk, ið eru lýst í Frílendisætlanini, er neyðugt við ávísum tillagingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í serstøku byggisamtyktini fyri øki fram við Hoydalsá.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Serstaka byggisamtykt nr. 7 er galdandi fyri økið millum Hoyvíksvegin og Yviri við Strond. Tann norðari parturin av hesum økinum er somuleiðis fevndur av Frílendisætlanini, sí skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 - Frílendisætlan*. Hesin parturin liggur sum C1 øki og sum F øki í serstøku byggisamtykt nr. 7. C1 økið er lagt til almenn endamál og F økið er kannað miðstaðaendamálum, skrivstovuendamálum, heilsuendamálum o.t. Í Frílendisætlanini er ætlanin, at hetta økið skal nýtast til hundaøki.

Fyri at samsvar skal verða millum Frílendisætlanina og serstøku byggisamtykt nr. 7, er neyðugt, at økið, sum liggur sum F øki í serstøku byggisamtykt nr. 7, verður broytt til C1 øki, sambært kortskjali *Serstøk byggisamtykt – eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru m.a.:
- *Eindirnar kunnu bert verða nýttar til almenn endamál.*
- *C1 verður lagt sum almenningur.*

Ásetingar fyri F øki í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru m.a.:

- *Økið verður kannað miðstaðaendamálum, skrivstovuendamálum, heilsuendamálum o.t. og til virksemi, ið hevur samband við hetta.*

Løgtingslóg um náttúrufriðing:
- *§ 2. Stk. 2. Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*
  4) *Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum.*
  5) *Nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi*
  6) *Nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Samstundis sum økið verður broytt frá F øki til C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7, verða broytingar gjørdar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, soleiðis at alt økið, sum Frílendisætlanin fevnir um, verður lagt sum D1 øki.

Ikki er neyðugt við broytingum í serstøku byggisamtyktini fyri økið fram við Hoydalsá, av tí at samsvar er ímillum ta serstøku byggisamtyktina og Frílendisætlanina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Broyting í almennu byggisamtyktini í sambandi við frílendisætlan við Boðanes – Hoydalar*, journal nr. 18/03528.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er sent til hoyring hjá friðingarmyndugleikanum sambært § 2., stk. 2. Punkt 1 og 2. Svar er ikki komið enn.

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt nr. 7* – Frílendisætlan, journal nr. 18/03529-2.
*Serstøk byggisamtykt* – áðrenn broyting, journal nr. 18/03529-2.
*Serstøk byggisamtykt* – eftir broyting, journal nr. 18/03529-2.
*Serstøk byggisamtykt* – tekstur, journal nr. 18/03529-4.
*Frílendisætlan,* journal nr. 18/03529-2.
*2017.05 Frílendið Boðanes Hoydalar*, journal nr. 18/03529-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtykt nr. 7 verður broytt sambært kortskjølunum, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. februar 2019 | Blað nr.: 191<br><br>Formansins merki: |

# 46/19 Nýggj høli til rakstrarstovn við Oyggjarvegin matr. nr. 1230b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 48/19 | 19/00691-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 46/19 | 19/00691-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við umskipan av teknisku deild, við at leggja allan raksturin í ein stovn, hevur tekniski stjórin reist málið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í norðurendanum av maskinhøllini við Oyggjavegin eru uppsettar bingjur, har formenninir hava skrivstovu. Sum víst á í fleiri ár, so eru hølini í sera vánaligum standi og eiga at verða gjørd av nýggjum sum skjótast.

Í sambandi við ætlanina at gera ein rakstrarstovn, at taka sær av øllum rakstri á tekniska økinum í Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt eina tørvslýsing sum vísir, at brúk er fyri at byggja ein nýggjan bygning uppá 120 m2 í tveimum hæddum, íalt 240 m2.

Innrætting:
- Inngongd og móttøka
- Skrivstovur til starvsfólk
- Køkur og matarstað
- Umklæðing, wc/brúsa, vaskimaskina
- Gongir, trappa v.m.

Útbjóðing og tíðarætlan:
Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku, soleiðis arbeiðið kann byrja sum skjótast og verða liðugt í ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1230b liggur í umráðispartinum B4 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar m.a. eru:

> *Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.*
> *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin frávik

**Umhvørvisárin**
Verður viðgjørt eftir umhvørvistigi 2-3

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Húsaumsitingin hevur verið við til at gera uppskot til bygningina.

**Skjøl**
19/00691-3 Tørvslýsing og kostnaðarmeting
19/00691-2 Støðumynd

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Bygningurin verður mettur til at kosta kr. 5.000.000 íroknað 6,25% mvg og fast innbúgv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at verandi skúrðar við endan á høllini við Oyggjavegin verða tiknir niður og nýggjur bygningur á 2 x 120 m2 bygdur á staðið.
- at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku, soleiðis arbeiðið kann byrja sum skjótast og verða liðugt í ár.
- at játtaðar verða kr. 5.000.000 til arbeiðið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 5 mió av tøkum pening til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

# 47/19 2018 September PHD project proposal

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.02.2019 | 11/19 | 19/00533-2 |
| 2 Vinnunevndin | 11.02.2019 | 11/19 | 19/00533-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 66/19 | 19/00533-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 62/19 | 19/00533-2 |
| 5 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 47/19 | 19/00533-2 |

**Upprunin til málið:**
Í 2015 varð samstarvsavtala millum Fróðskaparsetur Føroyar og Tórshavnar kommunu undirskrivað. Í 2017 samtykti býráðið at menna samstarvið til eisini at umfata møgulig stuðul til phd-verkætlananir.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fróðskaparsetur Føroya søkja Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til ph.d. verkætlanina:
***"Transscalar Innovation and Sustainability: Creating Sustainability Agents in the High North and Arctic"***
Ph.d. verkætlanin er samstarv millum Danmarks Tekniske Universitet (DTU) og Fróðskaparsetur Føroya (FF). Endamálið við verkætlanini at granskað hvussu **skipað samstarv** (Triple Helix) millum ymiskar samfelagsaktørar, til dømis kommunur, landsmyndugleikar, Íverksetaraskipanir, vinnufyritøkur, felagsskapir, universitet og vitanarstovnar kunnu fremja burðadygga samfelagsmenning og nýhugsan.

Framtíðar avbjóðingarnar eru sera stórar og torgreiddar. Tær eru merktar av at tær er heimsumfevnandi og ávirka okkara veðurlag, umhvørvi og vistskipanir og har ígjøgnum okkara vælferð og framtíðarvánir. Tað er neyðugt at øll lyfta í felag og taka ábyrgd í mun til at ganga ímóti hesum avbjóðingum. Tí hevur ST í 2015 viðtikið sonevndu heimsmálini fyri burðadygga menning (Sustainable Development Goals), sum hava fingið gildi frá januar 2016, har heitt verður á øll heimsins lond, teirra stovnar, fyritøkur og borgarar at virka fyri at fremja heimsmálini.

Phd-verkætlanin tekur støði í hugtakinum engaged scholarship og er tí bæði ein teoretisk og ein praktiskt verkætlan, sum proaktivt roynir at finna loysnir saman við samstarvspørtum samstundis sum at teoretisk gransking verður framd.

Verkætlanin verður framd í samstarvi við DTU (Institut for Management Engineering) og er ætlanin at tann ph.d. lesandi kemur at verða á DTU og á Fróðskaparsetrinum áleið helvt um helvt av tíðini eftir nærri avtalu.

Høvuðsspurningarnir sum verkætlanin hevur sett sær fyri at lýsa eru:

- Hvussu eitt universitet saman við Triple Helix áhugapørtum (akademiskt, vinnuliga og fyrisitingarliga) kann samskipa burðadygga nýskapan í mun til heimsmálini, og
- Hvussu eitt universitet kann gerast ein týðandi partur av burðardyggari nýskapan í Føroyum, í Útnorði og í Arktis.

Viðkomandi phd-lesandi byrjaði upp á phd-verkætlanin 1. desember 2018. Hann kemur at arbeiða við verkætlanini í 3-4 ár. Phd-verkætlanin er mett at kosta umleið 1,85 mió kr. DTU fíggjar umleið 50%. Enn manglar umleið 900 tkr. í fígging.
Lagt verður upp til, at kommunan stuðlar phd-verkætalanin við kr.150.000 um árið í 3 ár – kr.450.000 tilsamans og at tað verður skotið upp at fíggja tað soleiðis:

| | | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| 5366 | Stuðul annars | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 6610 | Umhvørvistiltøk o.a. | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 7310 | Vinnustrategi | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| | Kr. tilsamans | 150.000 | 150.000 | 150.000 |

**Hugskotið**
Fróðskaparsetur Føroyar hevur samstarv við fleiri deildir í Tórshavnar kommunu. M.a. Hugskotið. Hugskotið og Fróðskaparsetrið húsast bæði í Sjóvinnuhúsinum og ætlanin er at fáa eitt tættari samstarv millum stovnarnar. Fróðskaparsetrið er í gongd við at menna ein nýskapandi depil, sum millum annað skal arbeiða saman við Hugskotinum. Hugskotið varð í heyst á einari kunningarferð í Aarhus, her sum eitt íverksetarahús lá saman við Aarhus Universitet. Tað samstarvið gav nógv til bæði íverksetarar og universitetið. Tí verður arbeitt uppá at fáa ein formella samstarvsavtalu gjørda.

Viðkomandi phd-lesandi hevur verið í tøttum samstarvi við Hugskotinum og tí kann henda PhD verða við til at skapa grundarlag fyri einum størri samstarvi millum Hugskotið og Fróðskaparsetrið og sum heild geva Hugskotinum og íverksetarum íblástur.

**Umhvørvisdeildin**
Umhvørvisdeildin metir, at tað er skilagott og umráðandi, at Tórshavnar kommuna hevur samstarv við granskingarumhvørvið á Setrinum, eitt nú við at stuðla viðkomandi PhD-verkætlanum. Ítøkiliga PhD- verkætlanin hevur ávísar synergieffekter við serliga arbeiðið hjá Hugskotinum innan nýskapan.

Heimsmálini hjá ST (Global Agenda 2030) eru eisini ein liður av PhD-verkætlanini, og tískil sampakkar arbeiðið í verkætlanini í ein ávísan mun við arbeiðið hjá Umhvørvisdeildini á hesum øki.

Umhvørvisdeildin arbeiðir við ymiskum verkætlanum við støði í umhvørvispolitikkinum ‘Grøna Leiðin’, sum samsvara væl við nøkur av heimsmálunum hjá ST.

Við verkætlanum og átøkum innan ‘Grønu Leiðina’ er Tórshavnar kommuna við í norðurlendskari frágreiðing (*Global goals for local priorities: The 2030 Agenda at local level*), sum lýsir hvussu norðurlendskar kommunur arbeiða við heimsmálum hjá ST. Harímillum er Tórshavnar kommuna eyðmerkt sum ein undangongu kommuna við sínum arbeiði við heimsmálunum innan umhvørvisøkið.

Umhvørvisdeildin arbeiðir við at samantvinna Grønu Leiðina og heimsmálini enn meiri og at sjónliggera hetta bæði innanhýsis í kommununi og mótvegis borgaranum.

**Mentamáladeildin**
Mett verður at henda verkætlanin er eitt gott og spennandi høvi hjá kommununi at gerast partur av eini viðkomandi PhD-verkætlan og soleiðis bróta slóð fyri at náa málum settum í samstarvinum við Fróðskaparsetrið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 15/03535 Samstarvsavtala við Fróðskaparsetur Føroya.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi.

**Umhvørvisárin**
Ikki viðkomandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Sí omanfyri.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini, leiðarin á mentamáladeildini og leiðarin av Hugskotinum mæla býráðnum til umvegis vinnunevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og mentamálanevndina at játta kr. 150.000 næstu 3 árini. Tilsamans kr. 450.000.

Mælt verður til, at verkætlanin verður fíggjað soleiðis:
kr. 50.000 um árið av konto 5366 Stuðul annars
kr. 50.000 um árið av konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a. og
kr. 50.000 um árið av konto 7310 Vinnustrategi

Samstundis verður mælt til, at kommunan, Hugskotið og Fróðskaparsetrið taka stig til at gera eina formliga avtalu um framtíðar samstarv millum Hugskotið og depilin innan nýskapan og koma aftur í nevnd við endaligum uppskoti til støðutakan.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Vinnunevndin 11. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019: S**amtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

Gunvør Balle fór av fundinum vegna ógegni og tók Tráin Nónklett sæti í hennara stað.

| | Býráðsfundur<br>28. februar 2019 | Blað nr.: 197 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 48/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019: Framlagt.**

**FUNDURIN LOKIN KL. 21.00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein | Jákup Dam |
| Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Bjørg Dam |
| | Odd Færø | |